# FF blaðið

BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Nr. 306 Hósdagur 27. november 2003 10,-




## Skelja-ráðstevnan

**Víst hava gomlu føroyingarnir etið agn!**

Síða 2

## Óli Samró gransk-ar í Hollandi

Óli skipar fyri altjóða ráðstevnu komandi ár.

Síða 21

## 40 ár síðan Syðradalsbáturin gekk burtur

Vit hava frásøgn frá minningarhaldinum á Syðradali.

Síða 18

## Sildarok á Skálafjørðinum



Síða 26

## Grønlandstíðindi frá Kára við Stein

Síða 4

# Gazet í Kirkjubø staðfesti gullaks fyri 100 árum síðani



**Vit hava frásøgn um Gazet Patursson, sum gjørdi urtagarðsvirksemi lønandi. Eisini var hann ein granskari av Guds náði. Vit kunnu vísa myndir av sjáldsomum plantum og summarfuglum, sum hann savnaði.**

Síða 13

# Avtøkan av rættarsamfelagnum gongur sum smurt

**Lýsing av eftirlitsvirkseminum hjá løgmanni**

Síða 8








KÄRCHER

Vit eru einaumboð fyri KÄRCHER trýstspularum til ídnað.



Vit umvæla eisini

TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/Tummas Andreasen · Varðagøta 29-30
FO-100 Tórshavn · Tlf. 31 34 42

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

**FF-blaðið:** Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
**Útgevari:** Føroya Fiskimannafelag

**Blaðstjóri:** Óli Jacobsen
**Layout:** Føroya Fiskimannafelag
**Prenttilgerð:** Føroya Fiskimannafelag
**Prent:** Prentmiðstøðin

**Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin**

**- kemur út annanhvønn hósdag**

# Skeljaráðstevnan



*Arne Nørrevang greiddi frá botninum undir Føroyum.*



*Jóan Pauli Joensen greiddi frá føroyskum matvanum. Skemtliga sum vanligt.*



*Primus motor á skeljaøkinum er Birgir Enni, og hann var eisini við til at skipa fyri ráðstevnuni.*

Sum kunnugt var ein norðurlendsk skeljaráðstevna í Havn seinasta vikuskifti. Fyriskipari var Birgir Enni "maðurin og havið" og Árni Nicolajsen, biologur. Endamálið við ráðstevnuni var at gera støðuna upp viðvíkjandi skeljadjórum í teimum ymisku norðanlondunum og at meta um møguleikarnar framyvir.

Stevnan varð sett fríggjadagin kl. 17 av Hjalta í Jákupsstovu, sum stutt greiddi frá teimum skeljum, sum eru undir Føroyum, og sum nakað verður gjørt burtur úr.

Tað mest vinnuliga er hummari og jákupsskel, sum gevur fitt av virksemi í landinum.

Síðan greiddu ymisk føroysk umboð frá botni, streymi, æti og veðri undir Føroyum, og dentur varð lagdur á viðurskifti, sum høvdu vit skeljar at gera.

### Framúr fiskasúpan

Í fundarsteðginum fríggjakvøldið varð borðrett við fiskasúpan, og sigast má, at henda smakkaði frálíka væl. Kom at hugsa um, at fyri nøkrum árum síðan var ein verkætlan í Føroyum um framleiðslu av fiskasúpan. Tað er merkiligt, at einki skuldi koma burtur úr hesi ætlan, tá ein kann royna hvussu væl fiskasúpan kann smakka.

Leygardagin var ein røð av fyrilestrum, har greitt varð frá royndunum av skeljavinnu í norðanlondum, og har eisini var tosað um møguleikarnar fyri samstarv á søluøkinum.

### Tá tey ótu krækling á Oyri

Her vóru eisini føroyskir fyrilestrar, og fara vit at tríva eitt sindur í fyrilesturin hjá Sofus Poulsen, sum er stjóri á rækju- og skeljavirkinum á Oyri.

Her fekst okkurt stuttligt at vita. M.a. hvussu fólk hava sæð uppá krækling í gomlum døgum norðuri í Sundalagnum. Vit hava ikki hoyrt um annað enn, at kræklingur varð nýttur sum agn, og at føroyingar ikki vildu seta seg so lágt, at teir fara at eta agn ella fiskaføði. Men soleiðis var ikki á Oyri. Her í Sundalagnum var allar dagar, menn minnast, ein "kræklingabanki", har fólk av staðnum fekk sær krækling til matna. Hesin banki var so nógv verdur, at hann gekk upp ímóti eini mørk í jørð! Men so komu útróðrarmenn eftir, at kræk-








*Skeljamáltíð. Væl sær tað út.*

lingur var góður til agn. Tá komu teir aðra staðni frá og rændu ikki bert kræklingin, men eisini grundarlagið fyri, at hann kundi endurnýggja seg, og hetta varð gjørt so dyggiliga, at enn tann dag í dag livir ikki kræklingur her.

Annars hava teir havt merkiligar matvanar har norðuri. Teir saltaðu tjøldur uppí tunnur og høvdu tey sum vetraføði. Men hetta var áðrenn tjaldrið rættiliga gjørdist tjóðfuglur!

Men føroyska skeljavinnan kom at liggja har norðuri. Hetta byrjaði við O.C. Joensen, abba Edmund, í 1890. Fiskivinnuvirksemið byrjaði í 1957 við keypinum av "Agnes Louise", sum seinni gjørdist ímyndin av eini politiskari samgongu og ávísum løgmanni, sum kanska ikki var so galin kortini!

Umleið 1970 varð byrjað at dreggja eftir skeljum, fyrst við "Poppy" og seinni við "Norðheim". Tað skal sigast, at fleiri hava roynt tað sama, men tað eru bert Oyramenn, sum eru eftir. Hetta gekk so mikið væl, at í 1986 var farið í holt við at byggja rækjuvirki.

O.C. Joensen er í dag ein av stóru fyritøkunum í landinum. Teir útfluttu í fjør fyri 165 mill, hóast kreppuna í rækjuvinnuni. Tað er óneyðugt at siga, at virkið hevur sera stóran arbeiðsskapandi týdning í hesum økinum.

Framleiðslan av skeljum eru um 4.000 árliga. Tað kann skifta frá ár til ár av veðri og tílíkum. Veitt hevur verið mest eystanfyri, men roynt hevur eisini verið norðanfyri. Men her hava skeljarnar fyri ein stóran part verið tómar og virðisleysar. Hetta er tað sum hendir, tá skelin verður veidd "ov seint". So kanska er her eitt tilfeingi sum fer til spillis. Kanska kann nakað gerast her, men tað eigur at verða gjørt í samstarvi við útróðrarmenn, so teir ikki føla seg nervaðar.

### Ivasamt við kræklingi

Eitt, sum hevur verið umrøtt, er møguleikarnir fyri at ala krækling. Hetta er neyvan so lætt sum at siga tað. Taka vit Noreg, so ala teir bert eini 2.000 t. av heilum kræklingi árliga, og hetta er nærum einki. Tað einasta landið, sum fær tað at bera til við kræklingi, er Hetland. Men her hava teir ein sera stóran heimamarkna, og er tað fyrst restin av Stórabretlandi og síðan ES. Men hildið verður tó, at uppá sikt kunnu vera møguleikar, tí tey stóru kræklingalondini í ES hava bert avmarkaðar møguleikar at økja teirra framleiðslu. So økist forbrúkið kann hetta skapa okkum møguleikar.

### Aðrir møguleikar

Tað var einaferð, at FF var við í royndum at fáa nakað burtur úr igulker. Tað kom ikki nógv burtur úr tí. Men tað sigst, at sovæl í Íslandi sum í Noregi, hava teir ikki slept endanum. Tað verða eisini royndir gjørdar í Føroyum at **føða** igulker.

Men annars verður sagt, at tað, sum mest er til av botndjórum inni á firðunum, er sjópylsa. Spurningurin kom eisini fram á fundinum um, hvørjir møguleikar eru her. Tað ber illa til at siga nakað vist um tað.

Men í okkara frásagnum úr Sitka í Alaska kundu vit greiða frá, at her fáa teir fitt burtur úr sjópylsu við at kava eftir teimum. Summir hava tað sum ítrív, meðan aðrir hava tað sum fulltíðarvinnu og fáa heilt nógv burtur úr. Vit hava nú sent fyrispurning til Alaska at fáa kannað, um tað er sama slag av sjópylsum, sum vit hava.

Eitt evni er eisini krabbar, har tað tykist, at menn eru rættuliga bjartskygdir. Nógv hevur verið roynt í Føroyum, uttan at nakað serligt er komið burturúr. Men nú er tað tó komið so langt, at menn ætla at fara at veiða krabba uppá at virka og frysta hann umborð. Tað ljóðar sera spennandi.

Leygarkvøldið var "fiskaveitsla" í Müller's pakkhúsi, har borðreitt varð bert við fiska- og skeljamati. Tað smakkaði óført.

Samanumtikið kann sigast, at nú tað kanska fer at ganga omanbrekku í Føroyum, eiga vit at taka táttin upp við at troyta allar teir møguleikar sum finnast, eisini á hesum økinum.



*Her eru tveir gamlir sjógarpar. T.v. er Bjarni Petersen, sum er ein av veteranunum í rækjuveiðuni. Tað er ikki nakað dulsmál, at hann kennir seg illa viðfarnan í málinum um "Arctic Viking". Høgrumegin er Leif Nolsøe. Hann var fiskiklógv við Cubatrolaranum í fleiri ár. Síðan hevur hann roynt eitt sindur av hvørjum. Hann hevur fiskað við russiskum trolara í Kyrrahavinum. Nú er hann skipari á einum trolara á støðd við okkara verksmiðjutrolarar, úr Suðurafrika, sum fiskar rossamakrel vestanfyri Afrika. Manningin er 48, og Leif letur væl at.*



*Fundarfólk.*



*Torleivur Hoydal, skipasýnismaður og Hans Andreas Joensen, reiðari og skipari við hugflogi.*



*Her hava vit part av unga ættarliðnum, sum eisini var umboðað á ráðstevnuni. Frá høgru er tað fyrst Heðin Jacobsen, sum arbeiðir á smoltstøðini í Svínoy. Síðan Magnus Joensen úr Kollafirði, sum júst nú arbeiðir við tveimum verkætlanum. Onnur er viðvíkjandi økologiskari aling, og hin er við umhvørvismerking av fiskavørum. Leif av Reyni skuldi verið tryggjaður eina framtíð sum bilsølumaður. Men hann hevði betri hug til fisk, og hann hevur fingið sær holla útbúgving innan aling, har hann eisini arbeiðir nú.*



*Hjalmar Hátún greiddi frá veðurvánum ikki á havinum men í havinum.*



*Sofus Poulsen, er stjóri á Oyri, og greiddu frá søguni við jákupsskel.*

# Grønlandstíðindi

frá Kára við Stein



**Vit frætta dag fyri dag, hvat ið er hent í Grønlandi.**

10. november

Í dag eru -11,6 stig, og eitt lot av eystri. Í morgun lá fyrrverandi Signabøtrolarin "Ocean Pride", nú "Newfoundland Pioneer" frá St. Johns, við bryggju. Teir vóru komnir inn higar at leggja gott 340 tons av svartkalva upp. Svartkalvin er heysaður og sporlið skorið av. Síðani er hann heilfrystur. Tað fæst ein prísur millum 22-25 kr. pr. kilo. Teir hava um 40 tons av svartkalvahøvdum. Fyri tey fáa teir imillum 10-12 pr. kg. Teir rokna við at sigla í morgin fyri døgurða. Maskinmeistarin er nólsoyingur og kemur úr Havn. Í kvøld var sagt, í teirri Grønlendsku TV-avísuni, at Royal Greenland og KNAPK vóru blivnir samdir um nýggjan krabbaprís, sum er hækkaður frá 14 kr. kg í 17 kr. kg. Hetta er fyri at royna at halda bátunum til, so at virkini í Asiaat og Sisimiut kunnu koyra árið út. Teir vóna at fáa um 300 tons av krabba restina av árinum.

Í dag skrivar Grønlandsposturin nr. 87, at frá í dag 10. nov., hevur Royal Greenland sett nýggjar prísir fyri ísaðar rækjur fyri limir í KNAPK.

Teir eru pr. kg.:

| | Prima-kvalitet | Sekunda-kvalitet |
|---|---|---|
| Ekstra Stórar | 9,70 | 4,60 |
| Stórar | 9,50 | 4,50 |
| Millum | 7,25 | 3,38 |
| Smáar | 3,50 | 1,50 |
| Serliga smáar | 2,00 | 1,00 |

Avreiðingarprísinir eru uttan møguligt prísískoyti frá landskassanum. Hesir nýggju prísir galda fram til 10. nov 2004, men kunnu uppsigast við einum mánaða ávaring

Partarnir hava skrivað undir uppá, at trolarnir sjálvir syrgja fyri lossing framyvir, og at Royal Greenland stillar trukkar og krana tøkar til lossingina.

Um so er, at TAC ikki verður uppfiskað á vanligan hátt, so eru Royal Greenland og KNAPK samdir, at samstarva við Landsstýrið um at fáa kvotuna uppfiskaða, og at KNAPK móttekur 0,15 oyru fyri pr. kg fyri tær rækjur, sum vera avreiddar tá. Hesi 0,15 oyru skulu fara í grunnin hjá KNAPK, sum er fiskimanna- og veiðumannafelagið.

13. november

Í dag eru -2,5 stig og stilli. "Lómur" kom inn at landa í morgun. Teir hava gott 80 tons inni av ísaðum rækjum. Teir fóru út leygardagin. Og so kom ein norskur línubátur "Frøyanes" úr Måløy inn. Teir fiskað svartkalva í canadiskum sjógvi. Skipið er 3 ára gamalt og góðar 40 metur langt. Eitt snøgt skip at síggja til. Eg legði til merkis, at motorurin liggur har frammi í skipinum. Skorsteinurin var í formastrini. Teir kunnu lasta 400 tons av frystum svartkalva. Teir hava gjørt ein túr, og hetta er annar túrurin. Teir hava um 100 tons inni. Teir komu inn við einum sjúkum manni. Teir fóru út aftur seinnapartin, og fingu mannin út aftur við.

14. november

Í dag er -4,7 stig og stilli. Ein skeljabátur kom inn at landa í dag. Teir hava 24 tons inni fyri túrin; ein góður fongur.

18. november

Í dag kom "Nanok Trawl" inn at landa. Teir hava knapt 400 tons inni. Teir fóru úr Danmark 12. okt. og byrjaðu í Eysturgrønlandi, men góvust. Har var so at siga onki at fáa. Tað sum fingið er, hava teir veitt her út fyri.

"Kinguq" frá Halifax er komin inn at bunkra. Teir vóru á veg suður eftir at royna, men tangaskipið, sum teir plaga at bunkra frá, var nakað sunnarlaga. Tí komu teir inn higar. Teir høvdu roynt í 4 dagar og høvdu 50 tons inni. Við "Kinguq" eru 3 føroyingar.

19. november

Í dag eru -4,7 stig og eitt lítið lot av norði. "Lómur" kom inn at landa í dag. Teir hava gott 60 tons inni. "Nanok Trawl" fór nýggjan túr í dag, og "Lómur" fór út aftur nýggjan túr í kvøld.

Grønlandsposturin skrivar týsdag 18. nov., nr 89, grein við hesi yvirskrivt:

Reiðararnir hava tað gott, men tað hevur samfelagið ikki.

Landið fær ov lítið aftur av allari rækjukvotuni ella Reyðargullinum úr havinum, sum tað verður kallað. Tað er skattaborgarin sum má gjalda fyri feilin, sum politikkarnir gjørdu í 1990, tá teir góðu 5 reiðarum, sum hava 7 rækjutrolarar, teirra loyvir. Skattur og gjøld, sum reiðaríini gjalda, er ikki nóg mikið at gjalda útreiðslur, sum samfelagið hevur av vinnuni. Her verður hugsað um fiskiveiðueftirlit, fiskifrøðiliga ráðgeving og økjandi umsiting. Bert eftirlitið kostar 20 mill. árliga. Umframt kemur danska eftirlitið, sum er ókeypis fyri heimastýrið.

Reiðaríini hava í fjør goldið 23 mill. í skattum og avgjøldum. Hetta er ein upphædd, sum teir deila saman við teimun neyðars fiskimonnum. Reiðararnir njóta gott av teirri lagaligu avskrivingarlóg, sum er í Grønlandi. Teir hava fingið útsett gjaldingina av eini skattaupphædd uppá 250 mill. kr.

22. november

Í dag er +1,1 stig og stormur av útsynningi, sunnan við regni og vátakava. Tað byrjaði í gjár við sama veðri. Allur smátrolara flotin kom inn fyri veður.


# FF-Blaðið

**– á sjógvi og á landi –**

www.fiskimannafelag.fo



Einkjur og einkjumenn við børnum, ið eru 16 ár og yngri, hava aftur í ár høvi at søkja Einkjugrunn Føroya um fíggjarligan stuðul.

Umsóknarblað fæst við at venda sær til Føroya Sparikassa, Stjórnarskrivstovan, Tlf. 348 000, Fax 348 400 ella via teldupostadressu: stjornarskrivstovan@sparikassin.fo

Freistin at søkja er 1. desember 2003.

**Einkjugrunnur Føroya**


## Takka fyri FF-blaðið

Tann 23. november fekk Kári hendan teldupostin frá føroyingunum við "Kiliutaq". Vit loyva okkum at endurgeva hann, sum hann stendur:

Her er ein lítil heilsan til tín og Fiskimannablaðið, áðrenn vit fara heim í jólafrí.

Sum tað fyrsta, vilja vit takka fyri møguleikan, vit fingu, at fáa blaðið á alnótini. Tað er ótrúliga hugaligt at kunna seta seg niður, tað veri seg á brúnni, verksmiðjuni ella í kontrolrúminun at lesa Fiskimannablaðið. Sum altíð, er tað áhugaverdur lesnaður við tí, sum rørir seg í tí føroyska samfelagnum. Og so eru altíð aktuellar frásøgnir frá fyrrverandi fiskimonnum, og ikki minst tíðindini frá tær (Kára).

Okkara útmynstring byrjaði 24. sep., og hava vit higartil verið inni og landað tríggjar ferðir.

Vit skula inn til Nuuk at lossa ta síðstu lastina á hesum sinni mánadagin 1. des.

2. des. flúgva vit heim at halda frí, og samstundis er tað okkara lutur at halda jólini heima í ár.

Vit hava verið ríkiliga vælsignaðir vid góðum fiskarí hetta tíðarskeiðið, vit hava verið umborð. Alt annað líka koma vit at røkka 1300 tons, áðrenn vit fara heim.

Sjálvt um hettar hevur verið ein heysttúrur, og tað ikki altíð skal roknast við besta veðri, hava vit so at siga kunnað roynt ótarnaðir.

Tann eini av okkara túrum vardi bert knapt 12 dagar. Vit kastaðu fyrstu ferð um middagsleitið tann 29. okt. og hálaðu síðstu ferð sunnukvøldið tann 9. nov. Tá vóru 345 tons komin í lastina.

Tað bleiv ikki brotið vakt ein einasta dag, so við 23 monnum umbord, má tað sigast at vera nakrir óførir fiskarar, sum vit hava. Í miðal fóru yvir 30 tons niður um samdøgrið.

Tað er við takksemi, at vit fara heim at halda frí, og kunna gevast fyri árið 2003. Vit kunnu líta aftur um bak og síggja, at tað higartil í ár eru knapt 6.000 tons farin um lúnningina á tí skjótt gomlu skútuni "Kiliutaq" – ikki so galið.

Annars vilja vit her frá "Kiliutaq", ynskja øllum sjómonnum við familju burtri sum heima, tær við familju og tykkum á Fiskimannablaðnum, eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.



*Kiliutaq.*

## Vit takka somuleiðis

*Vit í fiskimannafelagnum og FF-blaðnum takka somuleiðis og senda somu heilsanir aftur. Tað er stuttligt at kunna skriva, tá tað verður so væl móttikið.*

## Rætting

Í seinasta blaði, var árstalið, tá kistan hjá ommu Hjørdis Háberg var gjørd, komið skeivt fyri. Kistan var gjørd í *1784* og ikki í 1862.

# Talan er um Reyðabát



Vit hava fleiri ferðir lýst eftir, um nakar man kennast við hesa myndina, sum vit hava lænt frá Hjørdis Háberg. Tað vísir seg, at hetta er Reyðibátur, sum synirnir hjá Jørgen av Nesi áttu. Helst munnu tað vera teir, sum manna bátin, men tað er ringt at staðfesta hetta aftaná so langa tíð.

Annars var tað upprunaliga á Nesi so, at tað var tað prósturin, sum átti bátarnar í bygdini, og hann var tí eitt slag av reiðara. Men einaferð mátti tað henda, at menn fingu sær bát sjálvir, so teir kundu ráða sær sjálvum. Tað vóru synirnir hjá Jørgen, sum gingu á odda her. Hetta var ikki væl dámt av próstinum at byrja við, men tað mátti hann sjálvsagt sum frá leið lata sær lynda.

Annars sær tað út, sum at báturin liggur í Havnini, har teir kanska hava verið og avreitt ella verið onkur ørindi.

Sum víst á, í seinasta blaði, var Jørgen úrmælingur á sjónum og tað sama vóru synirnir. Tað kundi kanska verið á eini leið at greitt frá, hvat Anna Evensen, próstakonan, hevði at siga um Jørgen í sínum endurminningum:

Jørgen, den dygtige Baadfører

En Gang, for mange Aar siden, skulde der hentes en Læge fra Thorshavn til Næs. En ung Mand, Jørgen, sejlede efter ham. Paa Tilbagevejen, kæntrede Baaden og begge faldt i Vandet. Den 16-17 aarige Jørgen, reddede Lægen og svømmede med ham hen til en Klippe, der ragede op af Vandet. Heldigvis havde man observert Ulykken inde fra Land, og der kom saa en "ottemandsfarer" ud og bjergede dem. Senere blev Jørgen gift og fik en seks, syv sønner, og en af dem førte vor Baad, naar vi skulde til Thorshavn. Hændte det, at vi skulde ud paa en længere Tur og Gamle Jørgen var med, sang han altid en Salme, naar vi stødte fra Land. "I Jesu Navn saa farer vi". Medens den blev sunget, sad Jørgen og de andre Roere med blottet Hoved. Det var saadan en smuk skik. I Reglen sang alle Fiskere denne Salme, naar de sejlede ud. Kom de i Havsnød, lovede de Kirken i Vaag paa Suderø, Offergaver, som Regel Penge. Mange Aar efter, kuldsejlede Jørgen og druknede, han der var en af Færøernes dygtigste Mænd til at manøvrere Baade i de farlige Farvande. En Gang ved Juletid skulde min Datter Elisabeth og jeg til Thorshavn. Vor baad blev sat i Vandet og bemandet med de 6-8 Mænd, der plejede at ro vor Baad (de roede efter Tur). Jørgens Søn, der var Fmd. for Roerne, var meget dygtig og det var ingen Sag at sejle.

Føroya Sjómansskúli
Maritime College

Altjóða útbúgving

Tilboð frá Føroya Sjómansskúla:

Altjóða góðkend útbúgving, sum gevur vinnumøguleikar á sjógvi og landi um allan heim.

Tíðarhóskandi skúli við:

- nútímans simulatorútbúnaði
- góðum internetsambandi
- stórskýggja í felagshøllini
- góðum hølisviðurskiftum
- stórum parkeringsplássi
- og sera góðum útsýni

Tú ert vælkomin til bás okkara í Norðurlandahúsinum 5.-6. desember, har frættir tú um vinnumøguleikar - upptøkutreytir o.a.

Útbúgvingarnar á Føroya Sjómansskúla eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO



Nóatún 2
Postboks 104
FO-110 Tórshavn
Føroyar
Tel +298 357500
Fax +298 357502
farnav@farnav.fo
www.farnav.fo

## Ummæli av "Teir tóku land":

# Søgan um Grønland



*Hetta var einaferð okkara!*
*Luftmynd av Føroyingahavnini.*

Nú er 8. og seinasta bókin hjá Jógvan Arge um okkara virksemi við og í Grønlandi komin út. Og sigast kann samanumtikið, at hetta er eitt væla verk, sum lýsir ein stóran part av okkara fiskivinnusøgu. Við nógvum øðrum bókum, sum eru komnar út um okkara fiskivinnu, verður størri og størri partur av henni kortløgd. Hetta merkir, at søgan verður varðveitt fyri eftirtíðina. Tað kunnu ganga ikki so nógv ár, til eingin minnist hesa tíð, og tá er gott at kunna finna hetta fram aftur.

Sjálvur minnist eg, – og í hvussu er tey, sum eru eldri – í høvuðsheitum hesa søguna, men tað eru nógvir smálutir, sum koma fyri ein dag í eini slíkari bókarøð.

### Ein tann fremsta grundgevingin fyri sambandi

Hvussu nógv kann broytast í hesum lutfalsliga stutta tíðarskeiðnum, er Grønland eitt gott dømi um. Tá eg byrjaði at fáa áhuga fyri politikki og samfelagsviðurskiftum í 50-árunum, plagdi tað at vera tvinnar høvuðsgrundgevingar hjá sambands- og javnaðarflokkinum fyri at halda fast við sambandið við Danmark. Onnur var tann danski stuðulin. Seinast í 1950-unum var fíggjarlógin 15 mill, og danski stuðulin var 10 mill. "Og hvussu skulu vit nakrantíð kunna gjalda hesar 10 mill?", var spurningurin millum manna. Í dag er fíggjarlógin meira enn 200 ferðir so høg, ella omanfyri 3.000 milliónir.

Hin grundgevingin vóru tey rættindi, sum vit høvdu í Grønlandi takkað veri ríkisfelagsskapinum. Mistu vit tey, so var deyðin í durunum. Tað gingu bert fá ár, so vóru tey søga.

Hendan seinasta bókin hjá Jógvani umrøður júst hesi seinastu árini, tá tað gekk sjón fyri søgn, at í Grønlandi var einki at heinta, ríkisfelagsskapinum fyri at takka.

### Portugalstrolararnir

Í bókini eru fleiri kapitlar, sum umrøða avgerandi hendingar í okkara fiskivinnusøgu. Tann fyrsta, sum verður umrødd, er søgan um portugalstrolararnar. Júst henda søgan vísir eisini, hvussu nógv ið er broytt hesa tíðina.

Vit stóðu jú seinast í 50-unum í teirri støðu, at vit máttu gera nakað serligt fyri at fáa ein endurnýggjaðan fiskiflota. Hetta fekk Hákun Djurhuus, táverandi landsstýrismann, at bíleggja tríggjar nýggjar trolarar í Portugal. Hetta hevði eingin landsstýrismaður kunnað droymt um í dag, men tað var neyðin, sum noyddi myndugleikarnar at taka slík stig. Stigið var eisini í lagi, men har komu fleiri meinbogar í vegin. Annar var, at trolararnir gjørdust nógv dýrari enn ætlað. Teir skuldu kosta 3,8 mill, men komu at kosta 6 mill. Hetta var í eini tíð, tá tímalønin var um 5 kr, meðan hon í dag táttar upp móti teimum 100. Hetta vildi í dag svarað til einar 100 mill., ella tað sama sum ein stórur ringnótabátur. Men verri var, at vald vórðu spøl, sum riggaðu illa. Og hetta er nakað sum hevur týdning fyri ein trolara. Teir fóru at eksperimentera við



*Fyrsti báturin er sloppin inn í skúrin í Dagmarsvík, men høgt er upp fyri. Fleiri skúrar eru undirkavaðir.*



*Tað vóru eisini nógvar kvinnur í Grønlandi. Hesar vóru í Ravnsoynni, har tær eru inni hjá kontrollørinum. Hesar eru: Anna Johannesen, Skopun, Julia Højgaard, Toftir og Hanna Jacobsen, Sørvágur.*

elektriskum spølum, sum vist ikki høvdu verið roynd av slíkum trolarum áður.

Hesir trolarar eru nú eisini søga. Tann eini av teimum, "Vágbingur", endaði sum sjónleikarhús og matstova í Stockholm.

### Sorgarleikurin við "Nólsoyar Páll"

Síðan kunnu vit enn einaferð lesa um eina ta mest syrgiligu hending í okkara skipasøgu í nógv ár, og hetta var hendingin við "Nólsoyar Páll" í 1967. Skipið fekk ein sjógv og tað fekk stóra slagsíðu. Hetta fekk menn at fara í bjargingarbátin. Men til alla lukku vóru tað bert fýra mans, sum fóru, meðan tað miseydnaðist hjá einum fimta manni. Tað eydnaðist at rætta skipið uppaftur, og tað kom aftur til lands við øllum hinum monnunm. Men gummibáturin við teimum fýra monnunum varð ikki afturfunnin, hóast væl og virðiliga varð leitað. Hetta man vera ein hending sum hevur elvt til stóra sálarkvøl. Og ikki minst man hugsanin um, hvat hendi monnunum umborð, hava nervað tey avvarðandi og annars tey, sum vóru partar av hesi hending.

### Tá Føroyar máttu sleppa síni koloni

Tað stóð nógv á føroyingum, áðrenn teir lótu Føroyingahavnina fara. Tað var kanska eitt sindur lættari við skipum og bátum. Tá ikki meira var at fáa, mátti fiskiskapurin steðga av sær sjálvum. Veiðuførini kundu jú brúkast aðra staðni. Øðrvísi var við einum heilum býi. Hann kundi jú ikki flytast, og økið var jú "okkara". Tað økið, ein hevur fingið, sleppur ein ikki so lætt. Tí gav løgtingið eisini ár eftir ár veðhald fyri at kunnu varðveita okkara "land" í Grønlandi.

Minnist, at tann fyrsti sum í tinginuim mutaði ímóti framhaldi av hesum veðhaldinum, var Finnbogi Isaksen (nú Ísaksen). Tað varð roknað sum nærum kettarí ta ferðina. Men, sum tann realpolitikkari Finnbogi var, var hann tann fyrsti, sum dugdi at síggja, at hetta var burturspiltur peningur.

Um hesar bøkur er at siga, at her er helst meginparturin við. Kanska heldur onkur, at tað er gjørt ov mikið av í so máta. Men hin vegin mugu vit ásanna, at tað sum vildi ligið eftir, fyri at gera tað styttri, hevdi verið mist med alla. Tí ger tað kanska ikki so nógv, at okkurt møguliga er nóg so drúgført.

Ikki minni týdning hevur tað, at nógvar myndir frá hesi tíð í okkara søgu eru í hesum bókaverki gjørdar alment atkomiligar. Vit vita, at tað liggur eitt stórt ríkidømi í myndum ymsa staðni í landinum, og tí er tað av týdningi at flest møguligar av teimum koma fram í ljósið.

### Framúr leitiorðskipan

Tað, sum ger bókarøðina serstakliga nýtiliga er, at her er eitt sera gott yvirlit yvir fólkanøvn, staðarnøvn og skipa- og bátanøvn. Hetta ger tað lætt at finna fram til upplýsingar, ein sóknast eftir. Og her eru eisini ein hópur av nøvnum. Tað eru ikki færri enn gott 10 síður við fólkanøvnum, og leysliga roknað táttar í 1500 fólkanøvn fyri øll 8 bindini. Hetta sigur nakað um hvussu nógvir persónar, ið hava verið partur í hesi søgu.

Her kunnu nevnast nøkur nøvn, som ofta koma fyri: Jens Pauli og Poli í Dali, Eske Bruun, Jógvan Christiansen, Tórstein Christiansen, Petur Mohr Dam, Martin Ejdesgaard, Hans Jacob Ellingsgaard, Magnus Fuglø, Jesar Jacobsen, í Búðini, Richard Jacobsen, Victor Joensen, Birtu Lias, J F Kjølbro, Tórálvur Mohr Olsen, Niels W. Poulsen, Malmberg Simonsen, Claus Sørensen, Kvívíkar Tummas og Jákup Fr. Øregaard.

Hetta er ein blandingur av fiski- og útróðrarmonnum, politikkarum, vinnulívsmonnum og øðrum, bæði føroyingar og útlendingar, sum vísa breiddina á bókarøðini og okkara grønlandssøgu yvirhøvur.

Skipanøvnini eru leysliga tald eini 400 og bátanøvnini út ímóti tí sama.

Skipanøvn, sum ofta koma fyri, eru tey farmaskipini, sum førdu útróðrarmenninar til Grønlands og heim aftur. Og her er serliga talan um "Blik" og "Karin K".

Vit kunnu skoyta eina stuttliga søgu uppí. Einaferð var ætlanin, at senda fleiri hundrað mans til Íslands á sama hátt, sum menn fóru til Grønlands, men Skipasýnið segði nei. Hetta kundu menn ikki skilja. Ferðin til Grønlands var bæði longri og vandamiklari, tá hugsað varð um ísvandan.

Men tá var svarið, at sigling til Grønlands var innanríkissigling, meðan hon var uttanríkissigling til Íslands, og her vóru nógv strangari trygdarreglur! Tað skal nú sigast, at hetta hevði ikki kunnað hent í dag.

Samanumtikið er talan um eitt dygdarverk, sum eigur at vera hvønnmansogn.

Nú kundi ein verið freistaður at heitt á Jógvan um at nýtt sínar kreftir á hesum øki, har hann skarar framúr, heldur enn til politikk, men lat tað fara.

*ó.*



*Og um ikki Henrik Old eisini hevur verið í Føroyingahavnini! Her saman við Elisabeth Thomassen úr Sørvági.*



*Her er ein bátur komin inn at avreiða.*



*Søgan um portugalstrolararnar er eisini við í seinastu bókini. Tá FF fylti 50 ár í 1961, fekk felagið hetta modellið av trolarunum sum gávu.*

# Indianarahøvdingurin kemur í komandi blað

Vit lovaðu herfyri okkara lesarum eina samrøðu við ein indianarahøvding í Canada. Hetta hevur drigið eitt sindur út, tí vit skuldu hava meira tilfar úr Canada. Hetta er so komið, og samrøðan kemur í komandi blað. Vit kunnu í hvussu er lova, at hetta verður forkunnugur lestur. Vit fáa eitt innlit í indianaramentan, sum kanska ikki er sæð á prenti í Føroyum áður. M.a. greiðir James Robertson frá, hvussu hann dugur at tosa við djórini.

Samrøðan fer eisini at hava nakað við fisk at gera. Vit fara at frætta, hvussu laksur er ein partur av indianskari mentan, eins og vit fara at frætta um eitt hjá okkum ókent fiskaslag, sum eitur oolichan, sum eisini hevur ein serligan týdning.

Vit fara eisini í komandi blað at hava fyrsta part av bátasøgu hjá Símun Johan Wolles av Eiði. Símun Johan hevur havt tey serligu evni at minnast til, hvat menn hava greitt frá gjøgnum tíðirnar. Ikki minst við bátum og bátasmíð. Hetta fáa okkara lesarar eisini gleði av.

Tað er allar møguligar orsøkir til at lesa komandi blað.

*Vit koma at hitta James Robertson aftur í komandi blað.*



# Avtøkan av rættarsamfelagnum gongur sum smurt

**Tað er ikki bert Elektron, sum svíður fyri almenna rættarloysinum. Tað gera fiskimenn eisini!**

Málið um persónsupplýsingar er ikki bert ein spurningur um eina styrkiroynd millum Astrup Hansen og Høgna Hoydal, sum tað kann tykjast fyri almenningin.

Hetta er fyrst ein spurningur, um vit liva í einum rættarsamfelag ella ikki. T.v.s. um vit hava samfelag, sum verður rikið eftir skipaðum viðurskiftum, og har borgarin kann kenna seg tryggan um, at hann fær tann rætt, sum hann eigur.

Men tað er neyvan dagur, har vit ikki fáa váttað, at tað gongur fyri seg ein skipað avmontering av allari rættartrygd og – siðvenju í Føroyum. Og hetta kunnu vit skriva um í hvørjum blað, uttan enntá at endurtaka okkum sjálvar.

### Innlit í málið um persónsupplýsingar

Vit hava fingið innlit í tað brævaskifti, sum beint nú hevur verið millum løgmann og løgmálaráðið um nevnda mál. Tað einasta, sum er komið fram um málið, er, at løgmaður segði seg vilja viðgera hetta mál við tí álvara, sum lá í tí! Hetta varð gjørd við brævi til løgmálaráðið. Og á tingfundi herfyri boðaði løgmaður frá, at hann hevði fingið svar, og at tað var nøktandi hvat rættartrygd viðvíkir.

Hervið er so eitt ítøkiligt dømi, um hvussu løgmaður røkir sína eftirlitsskyldu mótvegis landsstýrismonnum.

Tann 28. oktober sendir løgmansskrivstovan løgmálaráðnum bræv, har settir verða nakrir ítøkiligir spurningar "um ivaspurningar um rættartrygd", sum felagið Peningastovnar vísa á í sínum brævi til løgmann.

Longu tann 3. november er svar skrivað, sum telur heilar fimm síður.

Støðið í hesum svari skal lýsast við bert at taka brot burtur úr. Annars verður greinin ov long.

### Álit hevur ikki rættargildi

Fyrst skal verða nevnt, at ein stórur partur av grundgevingunum eru úr einum áliti hjá rættarnevndini. Tað er annars staðfest við nógvum dómum, at eitt álit í einum løgtingsmáli hevur ikki rættargildi. Tað einasta, sum telur í einum rættarmáli, er, hvat lógin sjálv sigur. Hetta hevur FF tapt eitt mál uppá so seint sum í vár, hóast tað varð púra greitt út frá viðmerkingum, hvat ætlanin var við lógini.


Dátueftirlitið – Tinganes - Postboks 64 - 110 Tórshavn
Tlf. 314763 - E-mail: datueftirlitid@datueftirlitid.fo

Tórshavn, tann 13. juni 2002
2/2002

PF. Elektron
Staravegur 9
Postboks 219
110 Tórshavn

**Viðv. umsókn um at flyta persónsupplýsingar uttanlands.**

Sum boðað frá í skrivi 6. juni 2002, er Dáturáðið komið til ta niðurstøðu, at kunngerð nr. 152 frá 17. des. 2001 um flutning av persónsupplýsingum til útlond, soleiðis sum hon er orðað, ikki gevur greiða heimild til at nokta Elektron at flyta persónsupplýsingar í GjaldSkipanini til PBS í Danmark.

Í sama skrivi var eisini boðað frá, at ráðið vildi viðgera umsóknina sambært § 16, um flutning av upplýsingum til útlond, í lóg um viðgerð av persónsupplýsingum.

Í hesum sambandi hevur Dátueftirlitið frá Elektron fingið upplýst:

- Endamálið við viðgerðini, herundir grundgeving fyri at flyta upplýsingarnar til PBS í Danmark.
- Slagið av upplýsingum, sum skulu flytast.
- Hvussu kunningin til viðskiftafólkini, tey skrásettu, verður útint.
- Trygdina í skipanina, herundir í samskiftinum við PBS.

Grundað á hesi viðurskifti og á tað samskifti, sum PF. Elektron og peningastovnarnir í Føroyum frammanundan hava við PBS, hevur Dáturáðið á fundi tann 12. juni 2002 avgjørt, vísandi til § 35 stk. 6 í somu lóg, at ganga umsóknini á møti.

Vinarliga
Lena Nolsøe
fulltrúi

*Her er talan um eina heilt greiða tilsøgn til "borgara" frá einum myndugleika, sum hevur fingið heimild frá løgtinginum til tess.*

*Tilvildarliga snýr hetta mál seg um Elektron, men tað kundi snúð seg um hvønn sum helst. Í einum rættarsamfelag mugu borgarar kunna líta á eina slíka treytaleysa tilsøgn, eisini um hon er givin "av misgávum". Er hetta hent má tað vera trupulleikin hjá tí, sum hevur givið loyvið, og ikki hjá tí, sum hevur fingið tað.*

*Men nú er tað staðfest, at stendur tað upp til føroyskar myndugleikar, so kann* ***ikki*** *roknast við einum slíkum loyvi.*


**Politiskt/umsitingarliga skipanin:**

**4 ár og 7 mánaðar uttan svar!**

**Í næstseinasta blaði greiddu vit frá bert einum dømi um okkara "samskifti" við almennu umsitingina.**

Hetta snúði seg um tulking av ... svar komið. ... Tað vitstu vit av frammanundan ...

... eru sjey mánaðar farnir, og tað er framvegis einki ... Eitt er, at hetta er politikkurin hjá løgmanni. ... menn, sum eru offur fyri hesum rættarloysinum.

FISKIMÁLARÁÐIÐ
- 3 APR. 2003

*Hetta málið er ikki bert 7 mánaðar gamalt, men 4 ár og 7 mánaðar gamalt. Men í samsvar við almenna politikkin, stuðlaður av "andstøðuni" á tingi, er hvørki komið svar ella kemur nakað svar. Hetta er tað, sum politiska skipanin bjóðar føroyska borgaranum.*

*Hetta er bert* ***eitt*** *dømi av mongum um skipaða rættarloysið, sum rakar fiskimenn. Mál, sum FF hevur reist fyri nærum 5 árum síðani, hevur felagið als ikki fingið svar uppá. Og hóast nú nærum 8 mánaðir eru gingnir síðani felagið fekk skrivliga tilsøgn um svar, er einki komið enn. Hetta er sami myndugleiki, sum hevur eftirlit her og í málinum um Elektron.*

### Hvør skal svíða fyri óbrúkiliga kunngerð

Tað fyrsta sum hevur týdning í hesum máli er, at Høgni Hoydal ger eina kunngerð 17. desember 2001, har endamálið er at forða fyri at Elektron fær loyvið, sum teir hava søkt um...

Um hetta verður sagt í brævinum frá løgmálaráðnum:

*Eftir viðgerð av loyvinum til Elektron, har Elektron... fekk játtandi loyvi, boðaði Dátueftirlitið frá, at Dátueftirlitið metti kunngerðina verða ógjørliga at umsita. Dátueftirlitið valdi í ítøkiliga málinum at síggja burtur frá kunngerðini og gav loyvi samb. lógini.*

Um vit í fyrsta umfari taka hetta fyri áljóðandi, so ásannar HH, at hann hevur gjørt eina kunngerð, sum eftir hansara egnu útlegging, ikki útgreinar tingsins vilja. Tað skuldi sagt seg sjálvt, at tað kann bert vera ein, sum hevur ábyrgdina av slíkum kleyvarskapi, sum hetta mál má sigast at vera. Og tað er HH sjálvur. Og hetta reisir tann sera áhugaverda spurning um tað veruliga ikki skal fáa avleiðingar fyri **hann,** at hann hevur víst slíkt dugnaloysi. Soleiðis vildi tað verið í einum landi, har vanligar parlamentariskar mannagongdir eru galdandi.

Tað skuldi í hvussu er ikki verið avvarðandi, borgari sum í einum rættarsamfelag sveið fyri eitt møguligt mistak hjá landsstýrismanni. Men søgan vísir, at tað er júst hetta sum hendir.

### Ikki allur sannleikin

Men hetta er í hvussu er ikki allur sannleikin. Í brævi til Elektron tann 13. juni 2002 sigur Dátueftirlitið:

*Sum boðað frá í skrivi 6. juni 2002, er Dátueftirlitið komið til ta niðurstøðu, at kunngerð(in)... um flutning av persónsupplýsingum til útlond, soleiðis sum hon er orðað, ikki gevur greiða heimild til at nokta Elektron at flyta persónsupplýsingar í Gjaldsskipanini til PBS í Danmark.*

Hetta kann bert fatast soleiðis, at tá kunngerðin ikki forðar umrødda loyvinum, so **gevur** hon heimild til at geva givna loyvi.

Tað kann í hvussu er staðfestast, at orðingin í brævinum hjá løgmálaráðnum, sigur ikki allan sannleikan. Og tað er í hvussu so er ein snaring, tá løgmálaráðið snarar orðingina hjá Dátueftirlitinum um, at umrødda kunngerð ikki gav greiða heimild til at nokta Elektron at flyta persónsupplýsingar til, at kunngerðin var ómøgulig at umsita.

### Skal tað vera so lætt: Bert at gera eina nýggja kunngerð

Tað sum síðan hendir er, at eftir, at tað er staðfest, at HH hevur gjørt eina kunngerð, sum av egnum dugnaloysi, ikki lýsir "tingsins vilja", so ger hann eftir fleiri krummspring eina nýggja kunngerð, sum nú loksins lýsir "tingsins vilja". Og hon verður so daterað hálvtannað ár aftur í tíðina, nevniliga til 1. januar 2002.

Tá tosað verður um lóggávu við afturvirkandi gildi, og hetta má so eisini galda kunngerðir, verður skilt millum "begunstigende" og "bebyrdende" lóggávu. Tað fyrra merkir, at tað verða givin borgarum rættindi við afturvirkandi gildi. Hetta verður viðurkent vera í lagi. Tað seinna er at taka rættindi frá borgarum við afturvirkandi gildi, og verður tað roknað fyri at vera í minsta lagi ein óskikkur, sum skipað samfeløg halda seg frá.

### "Tað sum vendir niður vendir upp"

Tað er nærmast ræðandi, hvussu teir duga at snara seg burtur úr hesum í løg-

málaráðnum. Sagt verður í brævinum til løgmann:

*Orsøkin til at kunngerðin hevur virknað frá 1.januar 2002 er, at mett verður, at nýggja kunngerðin, sum verður sett í staðin fyri ta gomlu, er til fyrimuns fyri borgaran. Løgmálaráðið metir tað tískil vera hóskandi, at øll viðurskifti skulu metast eftir hesum nýggju og fyrimunsgevandi reglum.*

Hetta merkir, at ein slík kunngerð, sum henda, kann forsvarast, tí hon er til fyrimuns fyri borgaran í mun til eina kunngerð, sum samb. løgmálaráðnum sjálvum, ikki kann umsitast! Og hon er enntá til fyrimuns fyri borgaran í eini avgerð, har játtanin er grundað á sjálva lógina og ikki á umrøddu kunngerð, hóast talan er um eina greiða skerjing.

Soleiðis kann altíð fáast bíløgd niðurstøða

Hetta er í veruleikanum tað mest avdúkandi í hesum brævaskifti. Tað avdúkar einsamælt eina rættarfatan, sum skuldi fingið hárini at reist seg hjá borgaranum. Kann tað bera til at snúgva seg soleiðis burtur úr ein klart "bebyrdende" kunngerð, so er einki mark fyri, hvat kann gerast á øðrum økjum eisini.

Hetta er annars eitt "frálíkt" dømi um tað serføroysku løgfrøðina, sum vit so ofta hava víst á her í blaðnum. Tað ber til hjá einum og hvørjum politiskum myndugleika at "bíleggja" eina løgfrøðisliga niðurstøðu, har grundgevingarnar bert eftir "hug en hæl og klip en tå" prinsippinum, verða lagaðar til niðurstøðuna.

Henda framferðin er eisini fult út í samsvar við fráboðanina hjá HH á heysti 2002, tá hann samb. heimasíðuna hjá útvarpinum ikki helt, at *"eitt brot á siðvenju í rættarsamfelagnum... hevur so nógv at týða í hesum sambandi."*

Vit kunnu vátta, at tað er so sanniliga ikki bert her, at tað verður tikið so lætt uppá grundreglurnar í rættarsamfelagnum. Tað verður meira og meira almennur politikkur. Og hetta kennir fiskimannafelagið serstakliga væl til.

Víðari sigur HH í somu tíðindum: *Tað hevur størri týdning, at virða lógirnar, sum løgtingið hevur samtykt.*

Til hetta er fyrst at siga, at løgmálaráðið júst førir fram, at givna loyvi er givið júst samb. lógina um persónsupplýsingar. Hetta kundi bent á, at dátueftirlitið ikki metir samsvar at vera millum lógina og álitið í málinum.

Men sera behendugt nýtir HH viðmerkingarnar, tá hann ikki kann nýta lógina.

> **Kunngerð nr. 152 frá 17. desember 2002**
> Sambært tilmælinum frá rættarnevndini varð kunngerð nr. 152 frá 17. desember 2002 um flutning av persónsupplýsingum til útlond gjørd, og endamálið var júst tað, sum varð álagt landsstýrismanninum av løgtinginum, nevniliga at áseta greiðar reglur í kunngerð um flutning av persónsupplýsingum til útlond, herundir steðga ella avmarka útflutningi av persónsupplýsingum peningastovnanna.
>
> Rættarnevndin sigur soleiðis í álitinum:

*Nú kann ein og hvør koma at skriva skeivt. Men tað er nú hugvekjandi og í samsvar við ta fatan, sum ein annnars hevur av almennu rættartrygdini í landinum, at ein avgerandi kunngerð í hesum máli ikki verður endurgivin rætt. Her verður enntá tvær ferðir víst til "Kunngerð nr. 152 frá 17. desember 2002". Kunngerðin er annars frá* ***2001.*** *Og hetta veit ein og hvør, sum hevur minstu fatan av hesum máli. Hetta hava tey opinbart ikki á løgmálaráðnum!*

> Orsøkin til at kunngerðin hevur virknað frá 1. januar 2002 er, at mett verður, at nýggja kunngerðin, sum verður sett í staðin fyri ta gomlu, er til fyrimuns fyri borgaran. Løgmálaráðið metir tað tískil vera hóskandi, at øll viðurskifti skulu metast eftir hesum nýggju og fyrimunsgevandi reglum. T.v.s. at eisini tey, sum hava søkt um loyvið og ikki fingið svar enn, skulu viðgerast eftir nýggju reglunum.

*Hetta er grundgevingin fyri, at kunngerðin frá 16. juni 2003 er sett at galda afturvirkandi frá 1. januar 2002.*

*Um ein ikki visti betur, hevði ein hildið, at hetta var "svart skemt". Fyrst hevur løgmálaráðið gjørt eina kunngerð, sum samb. teimum sjálvum ikki kann umsitast, og sum tað tí verður sæð burtur frá í viðgerð av umsóknum.*

*Síðan verður gjørd ein nýggj kunngerð, sum er ætlað so ella so at tileinkisgera tað loyvi, sum er givið.*

*Og nú sigur løgmálaráðið, at henda nýggja kunngerðin saktans kann gerast afturvirkandi, tí hon er til* **fyrimuns** *fyri borgaran í mun til kunngerðina frá 17. desember 2001, sum ikki kundi umsitast, og sum tí als ikki hevur verið virkin!*

*Hetta metir løgmaður í sínum eftirliti av varaløgmanni at vera eina nøktandi frágreiðing!*

Hvat telur meira: rættarsiðvenja ella "politiskur vilji"

Og tað er so sanniliga eisini ein góður spurningur, hvat ið eigur at telja mest, "siðvenjan í einum rættarsamfelag" ella "politiski viljin".

Júst umrødda raðfylgjan hjá HH og landsstýrinum sum so, hevur givið tað úrslit, at rættarstøðan í landinum er sum hon er. Og tað er lætt at finna ræðandi úrslit av sama hugburði úti í heimi bæði fyrr og nú.

Kann ikki roknast við givnari tilsøgn?

Fyri at koma aftur til kunngerðina við afturvirkandi gildi. Her sigur løgmálaráðið um sjónarmiðið um, at Dátueftirlitið á umrødda grundarlag, reelt hevur tikið loyvið aftur:

*Til hetta kann viðmerkjast, at tann afturvirkandi týdningurin í viðgerðini, ikki sæst at hava havt týdning fyri avgerðina hjá Dátueftirlitinum, av tí at avgerðin hjá Dátueftirlitinum fyri Elektron, bert hevur virkað frameftir, t.v.s. aftaná at kunngerðin er komin í gildi.*

Hetta kann tað vera nakað um. Men bert tað, at eitt løgmálaráð kann hava slík sjónarmið, skuldi so sanniliga verið grundarlag hjá løgmanni, at reisa aðrar spurningar.

Dátaeftirlitið hevur opinbart fylgt teirri fyrisitingarligu meginreglu, at tað ber ikki til, at takað eitt givið loyvi aftur. Men grundað á seinnu kunngerðina hjá HH, hevur ráðið tikið ta avgerð, at seta avmarkingar í einum fyrr givnum treytaleysum loyvi.

Tað má vera ein sera avgerandi spurningur, um hetta kann vera í samsvar við ta rættartrygd, sum løgmaður hevur proklamerað í higartil seks løgmansrøðum. Men júst hesin spurningur verður als ikki nevndur í brævinum frá løgmálaráðnum.

Fyri tann, sum hevur áhuga í rættartrygd, kundi verið sera áhugavert at fingið eina frágreiðing um, hvussu hetta mál er øðrvísi enn eitt annað, eftir okkara tykki, líknandi mál, har fiskimálaráðið fyrst hevði givið borgara tilsøgn um studning til eina verkætlan, fyri seinni at taka hana aftur, við eini grundgeving, sum ikki varð umrødd í játtani, nevniliga at arbeiðið ikki varð gjørt í Føroyum.

Her sigur Føroya Rættur í einum "tilkendegivelse", sum hevði verðið dómur, um ikki fiskimálaráðið tók "játtandi til orða" og givið seg undir hesi støðu:

*Under henvisning til*
*at krav om arbejdets udførelse på Færøerne ikke er fastlagt i lov, bekendtgørelse eller forarbejder*
*at der ikke er sat betingelser herom i bevillingsskrivelsen, eller at det tydeligt er fremgået som en forudsætning*
*at afgørelsen er til skade for sagsøgeren, idet denne har stiftet selskabet og iværksat projektet, delvis på baggrund af den tilladte finansiering og de øgede indskuds- og lånemuligheder dette bevirkede, samt at der ikke foreligger en væsentlig begrundelse for sagsøgte (Fiskimálaráðið), herunder at det ikke ses at være en væsentlig ændring i det faktiske grundlag, findes betingelserne for at tilbagekalde bevillingen ikke at være til stede.*

Her verður beinleiðis sagt, at ein tilsøgn frá almennum myndugleika er bindandi. Men tann spurningur, sum hetta málið um persónsupplýsingar reisir er, um tað er í samsvar við galdandi lóg ella við góðan fyrisitingarsið, at settar verða **aftaná** slíkar treytir við eitt "reint" og treytaleyst loyvi, at loyvið so við og við verður virðisleyst. Hetta tykist at vera beinleiðis í stríð við Føroya Rætt.

Hesar og fleri aðrar spurningar kundi løgmaður sett løgmálaráðnum, um hann veruliga hevði farið inn í hetta mál, við tí álvara, sum málið kravdi, sum hann boðaði frá.

Í staðin boðar hann frá, at svarið, sum veruliga bert er ein slutur fyri ein slatur, er nøktandi! Hetta er bert ein váttan um tað, sum vit hava vitað frammanundan, um eftirlitarbeiðið hjá løgmanni.

Rættarloysið rakar eisini fiskimenn

Hetta skipaða rættarloysið rakar sum sagt ikki bert Elektron. Sum vit hava greitt frá í einum hópi av greinum, rakar tað eisini fiskimenn og teirra felag. Enntá sjúkir fiskimenn hava fingið frátikið teirra greiðu rættindi uttan málsviðgerð yvirhøvur. Fiskimenn eru settur uttan fyri alt sum eitur fyrisitingarlóg.

Hetta er gjørt eftir sama "leisti" fyri eftirlit, sum í málinum um persónsupplýsingar.

Megingrundreglan í umsiting og eftirlit er, "går den, så går den". Og tað "går" av teirri orsøk, at í tinginum er helst bert ein tingmaður, sum hevur so frægt av rættarkenslu, at hann tekur rættarbrot upp.

Men úrslitið er, at tað verður nú meira og meira staðfest, at borgarar skulu ikki rokna við eini tilsøgn frá einum almennum myndugleika. Hetta er beint í stríð við eina megingrundreglu í einum rættarsamfelag.

Tað er neyvan ivi um, at í hesum máli eru nógvir leysir endar. Tað er eisini grund til at ivast í, um málið er avgreitt samb. grundreglunum í einum rættarsamfelag.

Teir fremstu spurningarnir eru hesir:

1. Skal ein landsstýrismaður, sum eftir egnum upplýsingum ikki hevur gjørt sítt arbeiði til lítar, kunna sleppa sjálvur undan við at koyra trupulleikan yvir til avvarðandi "borgara".
2. Skal tað í heila tikið kunna bera til, at borgari, sum fær eina tilsøgn frá almennum myndugleika, skal missa ella fáa avmarkað sítt loyvi, soleiðis sum greitt er frá.

Hesir spurningar eru als ikki viðgjørdir í politisku skipanini, hóast teir eru av avgerandi týdningi í metingini av, um vit hava eitt rættarsamfelag ella ikki.

Føroya Rættur:

## Bert lógin hevur týdning

*...Det fremgår af bemærkningerne til lagtingsloven, at reglen om færøsk bopæl blev indsat af hensyn til overensstemmelsen mellem indtægtssikringen og skattepligten på Færøerne.* ***Bemærkningerne om skattepligt har dog ikke fundet udtryk i selve lovteksten, og kan derfor ikke tillægges afgørende betydning...***

Hetta er bert eitt dømi, um hvønn rættarligan týdning viðmerkingar í einum lógaruppskoti hevur. Søgan er í stuttum, at løgtingið samtykti í 1997 eina lógarbroyting, har bústaður í Føroyum var ein treyt fyri at fáa inntøkutrygd. Eitt úrslit var, at fiskimaður, sum rindaði fullan skatt í Føroyum, vegna hesa ásetan varð útilokaður frá inntøkutrygd. Hetta var ikki í samsvar við "løgtings vilja", har tað kundi prógvast at tað var skattingin av viðkomandi, sum lá til grund fyri lógina.

Dómarin sigur, at hetta hevur ongan avgerandi týdning, tá "tingsins vilji" ikki sæst aftur í lógartekstinum. Hetta má sigast at vera eitt signal frá rættinum um, at tað er í sjálvari lógini, at tingsins vilji skal koma til sjóndar. Ger hann ikki tað er eitt at gera, og tað er at broyta lógina.

Men hetta hevur ongan áhuga fyri teir ið standa fyri serføroyska løgfrøði. Her er bert at fáa bílagt ta løgfrøðisligu niðurstøðu, sum brúk er fyri!


## Hjálpargrunnurin fyri óarbeiðsførar fiskimenn

Umsóknarbløð til grunnin fáast við at skriva til: **Postboks 2114, FO-165 Argir,** ella at ringja á tlf. 316089 (svarar eftir arbeiðstíð) ella leggja boð á telefonsvararan.

***Umsóknir til hjálpargrunnin mugu vera grunninum í hendi í seinasta lagi týsdagin 9. desember 2003.***

Hjálpargrunnurin

### Tíðindaskriv frá Kjølbro Heilsølu:

# Broyting í Mustad-umboðan

**Kjølbro Heilsøla hátíðarheldur í hesum døgum eitt ára dagin fyri yvirtøku av Mustad egningarmaskinunum í Føroyum.**


Finn Baldvinsson
*MUSTAD servica*


Poul A. Mikladal
*Marknaðarleiðari*


Jákup Mikkelsen
*Stjóri*

Hóast tað, so heldur stjórin, Jákup Mikkelsen, tað ikki vera tíð til at taka sær av løttum og hevur boða frá broytingum fyri at betra um arbeiðsgongdina og gera hana meira munadygga. Frá 1. des. verður sølan av maskinum, eykalutum, línum og húkum samanløgd og stjórna av einum persóni, heldur enn av trimum, sum skipanin er í løtuni. Finn Baldvinsson átekur sær hesar skyldur og er at hitta á telefon 471115 (fartelefon 223507). Uppseting og umvælingar verða gjørdar av POMEK, sum sendir nakrar mans til Noregs at fáa sær kunnleika og royndir.

Stórar broytingar eru eisini nýliga gjørdar á høvuðsdeildini hjá Mustad í Noregi. Bæði Leif Erich Dørffel og Svein Erik Bakke, sum fleiri føroyingar hittu á framsýningunum í vár og á fiskivinnustevnuni í Runavík, eru farnir frá Mustad, og John Ragnar Larsen hevur tikið ábyrgdina av søluni í Føroyum.

Poul Andrias Mikladal hevur fingið tøkk fyri sítt góða arbeiði at samskipa marknaðarføringina av Mustad og at seta upp eina 24-tíma tænastu. Eisini hevur hann gjørt eitt grundleggjandi arbeiði fyri at fáa Mustad umboðanina at virka. Henn heldur fram sum marknaðarleiðari á Kjølbro Heilsølu við serligum atliti til at fáa fyritøkui ISO9000 status.


**HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN**

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel.: +298 356 400
Fax: +298 356 401
e-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD VETERINARY AND ENVIRONMENTAL AGENCY

## Um flutning av alifiski v.m.

Kunngerð nr. 98 frá 8. juli 2003 ásetur, hvussu flutningur av akvakulturdýrum v.m. skal fara fram. Í kunngerðini verður m.a. ásett, at allur flutningur av akvakulturdýrum, -úrdráttum, -burturkasti, -fóðri og brúktari akvakulturútgerð skal fara fram í lukkaðum flutningseindum og soleiðis, at vatn ikki verður stoytt undir flutninginum.

Fiska- og djórasjúkudeildin á Heilsufrøðiligu starvsstovuni hevur sett sær fyri at fáa ætlanina við kunngerð nr. 98 frá 8. juli 2003 førda út í verki, og hetta førir m.a. við sær eitt víðkað eftirlit við, at allur flutningur av akvakulturdýrum fer fram við lukkaðum og góðkendum flutningseindum.

Við heimild í kunngerð nr. 98 frá 8. juli 2003 ger Heilsufrøðiliga starvsstovan fylgjandi ásetingar (um ikki annað er nevnt, eru allar tilvísingarna til hesa kunngerð):

- **EFTIR 15. JANUAR 2004 VERÐUR BERT LOYVT GÓÐKENDUM FLUTNINGSFYRITØKUM AT TAKA SÆR AV FLUTNINGI, SUM ER FEVNDUR AV KUNNGERÐINI**
  Søkjast skal um góðkenning innan 1. januar 2004.
- **EFTIR 15. FEBRUAR 2004 SKAL ALLUR FLUTNINGUR Á LANDI, SUM ER FEVNDUR AV KUNNGERÐINI, FARA FRAM VIÐ GÓÐKENDUM FLUTNINGSEINDUM**
  Søkjast skal um góðkenning innan 1. februar 2004.
- **EFTIR 15. FEBRUAR 2004 VERÐUR BERT LOYVT GÓÐKENDUM BRUNNBÁTUM AT TAKA SÆR AV FLUTNINGI, SUM ER FEVNDUR AV KUNNGERÐINI**
  Søkjast skal um góðkenning innan 1. februar 2004.

Viðvíkjandi sóttreinsing av frárensluvatni verður víst til kunngerð nr. 72 frá 26. juli 2002 um sóttreinsing av frárensluvatni frá akvakulturbrúkum og akvakulturvirkjum v.m. Sóttreinsing av frárensluvatni skal fara fram við tøkniligari útgerð og sóttreinsingarhátti, sum eru góðkend av Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Í nevndu kunngerð sæst, hvørji krøv verða sett til sóttreinsingarháttin og tøkniliga útgerð.

- **FLUTNINGSFYRITØKAN HEVUR ÁBYRGDINA AV, AT ALT FLUTNINGSVATN VERÐUR SÓTTREINSAÐ EFTIR GALDANDI ÁSETINGUM**

Sí annars heimasíðu okkara á **WWW.HFS.FO**.

Vinarliga
FISKA- OG DJÓRASJÚKUDEILDIN



**KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS**
FO-700 Klaksvík

## Sjúkrarøktarfrøðingar

**Deild A – kirurgisk seingjardeild**
Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing í farloyvi frá 01.01.04 til 31.10.04.
Arbeiðstíðin er 40 tímar pr. viku í skiftandi vaktum.

**Førleikakrøv:**
- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur.
- Fakligan áhuga innan kirurgiska sjúkrarøkt.
- Góð samstarvsevnir.
- Ynskiligt er við royndum innan økið.

**Setanartreytir:** - Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrarøktarfrøðingafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Marjun Joensen, deildarleiðara telefon 455463 lokal 519 ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu lokal 106.

**Deild M – medicinsk seingjardeild**
Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing í barnsburðarfarloyvi frá 01.01.04 til 31.08.04.
Arbeiðstíðin er 24 tímar pr. viku í skiftandi vaktum.

**Førleikakrøv:**
- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur.
- Fakligan áhuga innan medicinska sjúkrarøkt.
- Góð samstarvsevni.
- Ynskiligt er við royndum innan økið.

**Setanartreytir:** - Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrarøktarfrøðingafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Synnøvu Hansen, deildarleiðara telefon 455463 lokal 403 ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu lokal 106.

Umsókn við avriti av prógvi, autorisatión og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
Umsjónarmaðurin
FO-700 Klaksvík

Umsóknarfreist: **1. desember 2003**.


## Kollvelting innan samskifti á skipi

Kollvelting innan samskifti á skipi.

Tað er ikki óvæntað, at tann tøkniliga menningin av samskiftismøguleikum eisini mátti fara at síggjast aftur umborð á skipum.

Og tað er júst hetta, sum fyrst og fremst er hent umborð á Skálaberg.

Teir hava júst fingið útgerð, sum í einum tryggjar internet, sjónvarps og telefonsamband.

Hetta merkir fyrst og fremst, at innan sjóøkið, har skipanin virkar, og hetta er fyrst eystanfyri, har Skálaberg serliga fiskar, kostar tað nú bert beinleiðis 1,50 um minuttin at ringja til Føroya. Tað eru fýra telefonlinjur og tvær telefaxlinjur. Men internetið er einki mark fyri.

Tað er El og Tele sum umboðar hesa útgerð í Føroyum, og Skálaberg er fyrsta fiskiskip sum fær útgerðina.

Tað skal sigast, at útgerðin er rættuliga dýr, so kostnaðurin av útgerðini kemur afturat nevnda prísinum.

Men við tíðini plaga hesir prísir at fara niður. Undir øllum umstøðum er talan um kollvelting, og greitt verður nærri frá skipanini í komandi blað.

# Stórt bragd og ein faðir

Eitt kvøldið um ljósatendring fram undir jól í 1954 bankar á dyrnar hjá einum av lærarunum í Vági.

Hetta var eitt av teimum árunum, tá ið rættiligt sildarok var í Føroyum.

Við sluppum lógu føroyingar hesi árini um heystini og heilt inn í veturin úti á sildaøkinum norðan fyri Føroyar við gørnum.

Brast stormur á, og havið østist, tá ið farið varð undir at draga gørnini, var mangan hættisligt hjá monnum á dekkinum.

Skipið lá fast í sjónum tyngt av gørnunum full av sild, meðan drigið varð. Tað arbeiddi ofta harðari, og krappsjógvarnir fingu lættari leik at stinga seg upp við borðinum og leggja seg inn yvir dekkið, har teir mangan tóku tað, ið fyri var, við sær útaftur í hinum borðinum, tí tá ið drigið verður, er neyðugt, at skipið liggur meira við síðuni til móti veðrinum, og tá hava krappsjógvarnir fríari spæl.

Í slíkum líkindum hevur mong sluppin mist mangan mannin fyri borð. Summir fórust med alla, sum t.d. hann, ið sló út av sluppini "Henry Freemann" 9. okt. í 1954.

Aðrir vórðu á undursaman hátt bjargaðir inn aftur á dekkið, sum t.d. 14 ára gamli Johan Pauli Jensen úr Sumba, sum í sama veðri og sama dagin 9. okt. í 1954 sló út av sluppini Albert Victor, men sum varð fingin innaftur í síðstu løtu. Ja, Johan Pauli hevði ikki fylt sítt 14. ár, hann var sloppin við faðir sínum ein sildatúr hetta heystið; hann fylti ikki 14 ár fyrr enn 23. nov. hetta sama heystið.

Maðurin, sum hetta kvøldið í adventini í 1954 stóð uttanfyri og bankaði á dyrnar hjá læraranum, var Niklas, faðir Johan Paula, sum hevði fylt síni 50 ár hetta sama summarið 15. juli.

Lærarin fór sjálvur út at lata upp og bað hann ikki standa úti, men gera so væl at koma inn.

Teir fara báðir innar í stovuna og setast.

Sum tann lítillátni friðarmaðurin í allari atferð síni biður Niklas fyrst orsaka, at hann kemur soleiðis á dyr og ómakar fólk. Hann var komin til gongu úr Sumba í ávísum ørindum og kundi sjálvandi verið farin inn til onkran annan lærara ella eitthvørt annað skilafólk, men "nú kenni eg tygum so væl, so at eg loyvdi mær at koma til tygara við ørindum mínum," sigur Niklas at enda sum eina umbering fyri, at hann var komin inn.



*Niclas Frederik Jensen*



*Einar Thomsen.*

Soleiðis var Niklas; hann vildi ongantíð koma til ónáðir og var altíð skjótur at umbera seg, um so var, at eitthvørt var komið honum skeivt fyri.

Tá ið so lærarin hevði sagt, at hann var væl komin við ørindum sínum, og segði seg vilja hjálpa honum so væl, sum hann dugdi, við tí, sum honum lá á hjarta, tá fór Niklas at siga frá seinasta sildatúrinum hjá teimum við Albert Victor hetta heystið, hann hevði unga son sín við.

Teir lógu við Albert Victor á sildaøkinum norðan fyri Føroyar. Veðrið var ruskut til garnafiskiskap henda dagin við vindstyrki 6-7 eftir Beaufortstiganum, tað er 12-17 m/sek. Teir høvdu fingið gørnini inn, høvdu steðgað motorinum, lagt bakk og lótu hana mest sum bara reka, meðan gørnini vórðu bjargað til høldar, greidd, og dekkið ruddað.

Hvør maður stóð tiptur við sínum og hevði nóg mikið við at ansa sær, nú skipið lá heldur tvørt fyri veðrinum og leysum sjógvum.

"Og so var tað at hetta hendi," sigur Niklas rørdur á málinum og hyggur niður í gólvið.

Frammi á bógvi stóðu fýra mans og greiddu gørn – ein teirra var sonur Niklas, Johan Pauli. Sjálvur stóð Niklas aftari á skipinum. Hvør maður tiptur við sínum sum sagt, og mátti sjálvur ansa sær á dekkinum.

Nú fær hon ein skvamp, sum leggur inn yvir hana. Og tá ið so er, sætir hvør maður sær, sum vitiligt er. Í somu løtu, sum skvampurin breyt, var kokkurin, Einar Thomsen, ættaður úr Hvalba, giftur og búsettur á Økrum, 40 ára gamal, á veg hvítklæddur upp leitaran við øskuspannini.

Hann stakk seg niður undir kappan aftur, men kom uppaftur mest sum í somu løtu brotið hevði, og skipið lyfti sær aftur á luborð. Tá sá hann mest sum bara beinini á Johan Paula hvørva fyri borð av læbógvi.

Teir á dekkinum vóru, høvdu allir hugt upp í lu sum rímiligt var í slíkum føri, so at eingin teirra hevði varnast, at Johan Pauli hevði mist takið og fótafestið í skvampinum, fyrr enn Einar skar í róp. Tá lupu allir til lúnningina saman við Einari, men Johan Paula sást einki til. Hann var farin inn undir skipið, men tá ið skipið hivaði aftur til luborð, sá Einar Johan Paula, sum var í ljósum oljuklæðum, niðri í sjónum. Í somu løtu sum eitt síl rendi Einar seg uttan orð og boð, sum hann stóð, niður eftir dreinginum og fekk í hann, áðrenn skipið legði seg aftur á læborð.

Men av skipinum sóust teir ikki: teir vóru inni undir tí. Sjálvt um henda løtan var stutt, tóktist hon ómetaliga long, áðrenn Einar kom út undan aftur skipinum við Johan Paula framman fyri sær. Einari hevði eydnast við fyrstu roynd at kava niður á hann og fáa tak í hann. Tað hjálpti so væl, at drongurin var róligur, hóast hettan, hann var í, var snarað, so at hon vendi aftur og fram, og drongurin einki sá fyri sær. Johan Pauli dugdi ikki at svimja, og tá ið Einar fekk í hann, var hann longu í óviti.

So skjótt sum teir komu uppá, varð lissa kastað teimum. Teir vóru tá fitt frá skipinum. Einar helt Johan Paula framman fyri sær og royndi at svimja móti skipinum. Men so skjótt hann fekk fatur í lissuni, bant hann Johan Paula í, og sjálvur helt hann í lissuna. Væl gekk at draga teir at borði og taka teir inn.

Eingin ivaðist í, at Einar setti lív sítt í váða leysur at leypa út og inn undir skipið í slíkum líkindum.

Onkur heldur óivað, at hann skuldi havt lissu á sær, og tað hevði eisini verið rætt, men eingin visti av, fyrr enn Einar var uttanborðs – hann segði einki, og eingin bað hann; hann leyp alt í einum. Eftir bjargingina segði Einar, at hann væl hugsaði um at taka eina lissu á seg, men skuldi drongurin verða bjargaður, var einki sekund at geva út, og tá hevði drongurin valla komið livandi upp.

Einar ynskti sær ongantíð at koma aftur í eina slíka støðu – undir skipinum niðri í sjónum við vitleysum druknandi manni.

Móti hesum hevði tað verið lítið krevjandi at svomið íbundin móti veðrinum at bjarga einum manni.

Einar er av menskastu monnum. Longu sum smádrongur hevði hann sum nógvir aðrir dreingir í Hvalba lært at svimja á Heygsvatni, undir Garðshamri og á Hvalbiarsandi.

Jú, Einar vágaði lív sítt. Hann hevur konu og stóran barnaflokk á Økrum.

Niklas hyggur niður í gólvið eina løtu. So hyggur hann upp og sigur:

"Eg havi talað við allar teir, sum við vóru henda túrin. Vit eru samdir um at fáa onkran at skriva til "Carnegie's belønningsfond for heltemod" fyri okkum og mæla til, at Einar fær einahvørja heiðursgávu fyri stóra bragd sítt. Høvdu tygum ikki viljað gjørt okkum henda beina?"

"Hatta vil eg gleðiliga royna at gera so væl sum eg dugi," svarar lærarin og leggur aftrat: "Eg sendi tygum brævið, og so fara tygum til skipsmenninar og lata teir skriva undir brævið til Carnegiefondin."

Meðan Niklas hevði greitt frá, var kona lærarans komin inn við kaffi til teir báðar.

Nú kaffikopparnir eru tómir, og Niklas sigur seg hava fingið nóg mikið, leita eygu hansara aftur niður í gólvið eina løtu, áðrenn hann hyggur uppaftur og sigur:

"Tað var eisini eitt annað, eg ætlaði at biðja tygum gera fyri meg."

Nú fer hann í lumman, tekur ein tjúkkan brævbjálva upp og leggur á borðið.

"Hetta – at sonurin varð bjargaður á ein so undurfullan hátt, eigi eg fyrst og fremst at siga Gudi takk fyri. Tí vil eg spyrja, um tygum vilja ikki senda mær henda peningin til heidningamissiónina, t.d. D.M.S.!"

Lærarin telur peningin – eitt túsund krónur.

"Ein góð gáva!" sigur hann og tekur í hondina á Niklasi og leggur aftrat: "Tað geri eg við gleði fyri tygum!"

Niklas reisist og takkar fyri seg og biður orsaka, at hann hevur órógvað.

"Nei," sigur lærarin, "tað hava tygum ikki, heldur hevur verið hugnaligt, at tygum stukku inn á gólvið. Men hvussu, nú er myrkt, tygum fara ikki aftur til Sumbiar nú?"

"Jú, jú, beinanvegin," sigur Niklas, "hetta vóru ørindi míni í dag til Vágs. Eg havi lykt."

So bað Niklas góða nátt, ynskti gleðilig jól og fór.

Ein dagin komið var væl út í 1955, hittir lærarin Einar á vegnum. Teir kendust væl, heilsast og koma í prát.

Lærarin sigur einki um, at Niklas hevði vitjað seg, men hann ynskir Einari til lukku við "Medaljuni frá Carnegiefondinum" fyri at hava bjargað manni frá at drukna. Tey tíðindi vóru komin út millum manna.

Einar takkar og sigur læandi:

"Ja, hatta var stuttligt, men ein medalja er ikki etandi. Tá smakkaði geldseyðurin frá Niklasi væl betur. Tú – tað skalt tú trúgva mær – ein dagin í fjør heyst kom Niklas við hesum avbera góða geldseyðinum og legði mær í túnið. Tá ið eg spurdi, hví hann gav mær geldseyðin, segði hann bara:

"Gud vælsigni teg og tíni!""

Og Einar heldur fram: "Niklas er ein heiðursmaður; hann man mangan hava takkað Gudi fyri, at mær eydnaðist at gera mína plikt."

Og Einar lær ein blíðan látur.

Á vegnum aftur til húsar tann dagin hugsaði lærarin við sær: Soleiðis hugsa teir, sum gera tey stóru brøgdini sum Einar, og soleiðis eru heiðursmenn sum Niklas.

***Johs. Andr. Næs***

*Keldur:*

1. *Óprentað skjøl*
2. *Ítróttatíðindi nr. 8. 1955*




*Albert Victor.*

# Tað var manningin á "Emerald"

Vit hava við hjálp frá trúføstum lesarum funnið fram til upprunan av hesi mynd, sum vit høvdu í seinasta blað. Myndin er eisini í Siglingarsøguni hjá Páll J. Nolsøe, og her eru nøvnini eisini við.

Hetta er manningin á sluppini "Emerald", sum var ein slupp av Tvøroyri, og myndin er tikin í 1900, so hon er 103 ára gomul.

Teir sum eru á myndini eru hesir:

Sitandi f.v. Joab Magnussen, Saltangará, Jógvan Vang í Kálvhúsinum, skipari, Sámal Petur Knudsen á Vollanum, Glyvrum, Martin Vang í Kálvhúsinum, Glyvrum, Sofus Højgaard, Rituvík, seinri Tórshavn, og Jóannes Johannesen, í Beiti, Glyvrar.

Standandi f.v. Jógvan Magnussen á Lygnesi, Søldarfirði, Jógvan Davidsen á Gørðum á Nesi, Toftum, Jústinus Justinussen við Stein, Glyvrar, Niklái Joensen í Homrum, Kollafirði, Jógvan Olsen, Óli Petersen, hjá Agnas, Selatrað, Elias Olsen, Rituvík og Jákup Vang í Kálvhúsinum, Glyvrar.

Nevndi Jógvan Davidsen tók sær seinni eftirnavnið Næsaa. Hann var í nógv ár hovmeistari á "Smiril" hjá Mortensen á Tvøroyri, har hann búði í nógv ár, til hann flutti til Havnar. Hús hansara á Tvøroyri vórðu kallað "Hjá Hovmeistaranum". Hann hoyrdi ikki til manningina á "Emerald", men var kokkur á "William Clowes" av Tvøroyri hetta árið.

Hann var sonur gamla Jørgen Davidsen á Nesi.

Abbasonur Joab Magnussen, Johan F. Magnussen, greiðir frá, at abbin var millum teir fyrstu føroyingarnar, sum fóru uppá Rockall. Tey hava eina skel, sum skal stava harfrá.






*"Emerald" á Kappagrunni í 1940.*

## Rætt at afturhalda løn, tá ið handverkari ikki virðir uppsagnartíðina

Handverksmeistari hevur rætt til at afturhalda løn hjá handverkara, tá ið hesin ikki virðir uppsagnartíðina. Hetta er úrskurðurin í einum dómi í Føroya rætti, sum júst er fallin. Dómurin er ikki kærdur.

Í sáttmálanum millum Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna og Føroya Arbeiðsgevarafelag/Føroya Handverksmeistarafelag er í § 30 ásett, at uppsagnartíðin er ávíkavist 5/10 dagar, treytað av um handverkari hevur arbeitt styttri ella longri enn 2 ár hjá sama meistara. Uppsagnartíðin er galdandi fyri báðar partar. Brot móti uppsagnartíðin verður sektað við ávíkavist fyri handverkara við missi av 5/10 dagłønum og fyri meistara við at gjalda somu upphædd.

Ein meistari eftirhelt í lønini hjá einum handverkara grundað á omanfyri nevndu reglu. Landsfelag Handverkaranna legði sak ímóti meistaranum, men Landsfelagið hevur tapt málið. Rættarúrskurðurin sigur, at Landsfelag Handverkaranna ikki "har godtgjort, at der har været en kutyme for, at opsigelser kan ske uden varsel eller at sagsøgte konkret har accepteret dette".



**Vit gera allar vanligar bilumvælingar sera bíliga - so sum:**

Oljuskift, motorjusteringar

Umvæla bremsir, koplingar v.m.

For- og bakhjólsleiðir og akslar

Og so hava vit tey vælumtóktu "TYFOON" dekkini, sum vit skifta

**Sp/f Úrvalsbilar**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 444943 · 281943 · 217704

**AGN**



sild
kúfiskur
makrelur
høgguslokkur

hava dagligt samband um alt landið

**P/F KAMBUR**

STRENDUR - telefon: 447720
ella 448095 - fax: 448744

SENT VERÐUR VIÐ STRANDFERÐSLUNI

BAADER

Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.

**Pf. Petur Larsen**
Tlf: 44 41 74
Fax: 44 42 85

## Gazet Patursson:

# Tann ókendi kirkjubømaðurin

## *Staðfesti gullaks undir Føroyum fyri 100 árum síðani*
## *Føddur 6. juli 1879. Doyði 2. mai 1970*

**Vit koma í hesi grein at hava eina frásøgn um Gazet Patursson. Mótsatt hinum beiggjunum, var ikki nógvur hávi gjørdur burtur úr honum. Men hann hevur uppiborið eitt varandi eftirmæli. Hann var undangongumaður við urtagarðsvirksemi í Føroyum. Hann var vísindamaður bæði innan plantur og skordjór. Og so var hann javnaðarmaður í sjálvstýrisborgini í Kirkjubø!**

Patursson navnið er jú eitt kent navn í Føroyum. Tað verður søguliga fyrst og fremst sett í samband við brøðurnar í Kirkjubø við hesum navni, og sum hava havt eina sera stóra ávirkan á føroyska samfelagið.

Tann yngsti av beiggjunum var Gazet, sum var oddamaður innan fyri sítt øki, men hann hevur ikki verið eins nógv umrøddur av eftirtíðini sum hinir.

Hetta vilja vit fegin bøta um, so vit hava sett okkum fyri at fáa eina lýsing av honum. Veruliga er hetta gjørt eftir íblástri frá versoninum Eyðálv Djurhuus.

At lýsa Gazet er tó ikki ein helt løtt uppgáva. Tað er nevniliga sera lítið, sum er skrivað um hann. Nærum tað einasta vit hava funnið eru minningarorð, sum vórðu skrivað um hann av Niels Winther Poulsen, tá Gazet doyði, og eru hesi minningarorð eisini ein høvuðskelda til hesa grein.

Tað liggur heldur ikki serliga nógv skrivligt eftir hann, burtursæð frá brøvum frá donskum stovnum, sum hann hevði brævaskifti við.

Men vit hava góðar munnligar keldur. Vit hava tosað við børnini hjá honum, Sámal og Hildibjørt, verdøturnar Bodil og Elisabeth, abbasonurin Rasmus og Dortheu, einkjan eftir Ólav, sonur Páll og Bodil.

Vit hava eisini fingið eina frágreiðing um Gazet sum plantufrøðing frá Magnus Gaard á Plantusavninum á Debesartrøð. Hann er langabbasonur Rasmus á Háskúlanum, ein annan kendan plantufrøðing, sum eisini hevði neyv samstarv við Gazet.

Her skrivar Magnus:

*Ein av teimum áhugaverdu innsavnarunum av plantum í varðveitslu á Náttúrusavni Føroya er Olav Gazet Patursson. Onkrar av hesum plantum eru sera áhugaverdar. Leggstutt fransagras (Primula vulgaris), ið hevur vaksið á Traðarhamri heima á Sandi, finst bert innsavnað einaferð, og hesa innsavning hevur Gazet gjørt. Hendan plantan er ongantíð funnin aftur og er tí allarhelst útdeyð. Nógvar aðrar sjáldsamar plantur eru í savninum hjá Gazet, so sum tann villa rósan (Rosa villosa), ið nú er so gott sum útdeyð, kallsmansbórkubóndin (Orchis mascula) og nógvar aðrar. Onki er at ivast í, at Gazet hevur havt ein serligan áhuga í tí sjáldsama og eitt sindur eksotiska, tí av teimum 213 plantunum í savni hansara, eru nógvar at kalla sjáldsamar, ímeðan tær vanligu planturnar eru heldur færri. Gazet var urtagarðsmaður. Hann gekk á plantuskúla í Grude á Jæren. Seinni gekk hann á landbobáskúla í Danmark, men gavst vegna sjúku. Hann hevði stóran áhuga í plantunøvnum, og arbeiddi saman við Rasmus á Háskúlanum hesum viðvíkjandi. Hann gav út "List of popular plant names from the Faroes í 1905-08" og føroysk plantunøvn saman við Rasmussi í 1928.*

*Umframt plantur, hevði Gazet stóran áhuga í skordýrum, og gjørdi her týdningarmiklar eygleiðingar. Tíverri er lítið skrivað um hetta.*



*Fredrikka og Gazet .*

Í hesum sambandi kann verða nevnt, at Gazet eisini hevði nógv samskifti við ein annan kendan urtagarðsmann, Símun Paula úr Konoy í Gøtu. Tað vóru jú Rasmus og Símun Pauli, sum myndaðu fiskimannafelagið fyrstu nógvu árini. Tað tykist sum, at ansurin fyri tí, sum veksur og grør, hevur verið ein partur av politisku vekingini fyrst í farnu øld.

Bóndahusini í Kirkjubø

Gazet var føddur 6.juli 1879 og var yngstur av seks systkjum – fimm brøður og ein systir. Mamman var Elin Katrina úr bóndahúsinum Uppi í Stovu á Velbastað, og pápin var Pól bóndi í Kirkjubø. Hann og systkini gingu í skúla heima á garðinum. Lærarar vóru Jóan Jákup Dahl frá Krosslíð úr Vági og eftir hann, Hans Jákup Petersen, bróður Fríðrik Petersen próst av Saltnesi.

Gazet fór, eins og hinir brøðurnir í realskúla í Havn. Systirin, Sannulena, gekk í skúla aðrastaðni. Um skúlatíðina verður sagt í Táttum úr Kirkjubø eftir Jóannes Patursson og Fram við Sugguni eftir Sverra Paturssson, at brøðurnir untust stak illa í realskúlanum og í Havn annars, og hvønn leygardag fóru teir heim og kappgingu tá til Kirkjubøar. Jóannes sigur frá, at pápi teirra lat teir venja seg í fimleiki. Hann setti m.a. eina stong upp, so teir kundi læra seg at klintrast uppeftir við hondum og fótum, og hann lærdi teir at skjóta við byrsu.

Hóast teir ikki untust í Havn, viðurkennir elsti bróðurin, Jóannes, at tað fekk stóran týdning fyri tey systkini, at pápi teirra skipaði so fyri, at meðan tey vóru í Havn, skuldu tey tvær ferðir um vikuna fara til Jacobsen skómakara, abba Jørgen Frants og langabbi William Heinesen, til nátturða og har læra høviskar siðir. Skómakarin, sum eisini æt Jørgens Frants, og sum livdi 1819-1917, hevði nevniliga búð í Keypmannahavn. Somuleiðis sendi pápin børnini at læra eingilskan dans, allar teir ymisku dansir, sum verða nýttir, meira fyri at venja vakran atburð, enn



*F.v. Hildibjørt, dóttir Gazet, Rasmus, abbasonur, Sámal og Elisabeth, sonur og verdóttir Gazet og foreldur at Rasmusi.*

***Framhald á næstu síðu***

vegna sjálvan dansin. Dansilærarar vóru høvuðsprentarin á Dimmalætting, danskarin Aagaard, og Franciska Jacobsen, dóttir umrødda skómakara.

### Lívið í Kirkjubø fyrst í øldini

Áðrenn vit koma aftur til Gazet, hava vit fingið sonin Sámal at greiða okkum eitt sindur frá lívinum í Kirkjubø, tað hann minnist. Sámal er 86 ára gamal, so hann minnist til størsta partin av farnu øld.

Sum Sámal greiðir frá, so var Kirkjubøur ein lítil bygd. Har vóru tá bert eini 4-5 hús. Áðrenn Sámalsa tíð hevði Petur bóndi handil og keypti fisk, men tað hevur eingin handil verið í Sámalsa tíð. Vørurnar fingu tey úr Havn, og tær komu vanliga við rutubátinum, sum fór út í Hest og í Sandoynna. Báturin steðgaði á á leiðini, og so varð róð umborð eftir vøruni. Annars kom vegur til Kirkjubøar í 1925.

Siggert var pápabeiggi Sámal, men Sámal minnist hann bert, tá hann einstakar ferðir kom heim at ferðast. Sum øll kunnu meta, so hevur Siggert verið ein sjáldsamur maður, tá hugsað verður um hansara ferðing og frásagnir frá teimum. Eitt annað dømi um, at Siggert ikki hevur verið sum fólk flest, var, at hann hevði beklætt alla stovuna hjá mammu síni við myndum av sær sjálvum.

Sámal heldur ikki, at tey merktu so nógv til, at Kirkjubøur var ein politiskur miðdepil. Men her vóru tó ofta fólkafundir og vitjanir.

Hóast elstu kirkju í landinum, so var og er bert kirkjugongd í Kirkjubø, tá prestur er.



*Hetta er partur av urtagarðinum hjá Gazet.*

### Suggan og hólmurin

Øll hava hoyrt um sugguna í Kirkjubø. Tann vissasta innløgukeldan var tarin, sum rak inn hagar. Hesin gav eitt sera gott ískoyti til tøðini, sum annars fingust. Hetta merkti eisini, at tað var ikki stórur tørvur á kunsttøðum. Tað var vetrararbeiði at fáa taran til høldar, og varð hann koyrdur heim við hestavogni. Av øðrum, sum rak inn higar, var timbur, sum kundi brúkast til pelar og brenni. Undir krígnum róku inn higar, eins og aðra staðni, gummiballur, sum kundu nýtast til at gera gummiskógvar burturúr. Tað sama var við stearin. Av øðrum vóru boyur, sum kundi seljast.

Hólmurin hevði ein vissan týdning. Roynt var at hava neyt har, men tey svumu bert í land. Her vóru stórir flokkar av æðum, so viðhvørt varð roynt at savna æðudún.

### Sambandið við Velbastað

Sambandið tey høvdu var mest við Velbastað. Hagani komu fólk tá farið varð í kirkju, og kenda ungmannafelagið Sólarmagn var felags fyri bygdirnar.

### Áhuga fyri blómum og alt sum grør

Niels W. Poulsen skrivaði, at eins og navnið Sverre Patursson er bundið at fuglinum, so verður navnið Gazet Patursson ikki nevnt, uttan tú kemur at hugsa um blómur og urtir, ja, alt ið grør og prýðkar um náttúruna. Hann var urtagarðsmaður av Guds náði.

Alt frá barnaárum, var hugurin at fáast við plantur og urtir. Longu sum 16 ára gamal, fekk hann á framsýning í Havn, virðisløn fyri sera vakurt plantusavn.

Á ungum aldri fór hann til Danmarkar, og tveir vetrar var hann á Askov háskúla.

Sumrini, millum háskúlaskeiðini, var hann á landbúnaðarskúla og vann sær prógv sum agronomur.

Hann var eisini kanningarferðir bæði í Noreg og Svøríki, og afturkomin setti hann sær fyri at seta í verk tað, hann hevði nomið burtur í londum. Og tað má sigast, at væl hevur vignast hjá honum.

Hann kannaði alla sína tíð tað, sum vaks í haganum. Hann var eina tíð landmálari, so hetta hóskaði væl saman við hansara ansni fyri náttúruni. Hann leitaði altíð eftir nýggjum plantum, sum hann turkaði og goymdi. Hesar eru nú á Náttúrugripasavninum.

Lendið, hann fekk avlagt til urtagarð, var eitt satt ótøki. Eftir hesum lagaði hann garðin og setti húsini, so alt fall væl saman við náttúruni. Tað var sum alt, hann nerti við, fekst at grógva og blóma.

Urtagarður hansara gjørdist eitt satt listarverk. Og hann hevði evni at skapa áhuga hjá fólki fyri øllum, ið grør. Tað er nógv honum fyri at takka, at tað finnast nógvir vakrir urtagarðar runt landið, júst í tí sniði, sum hann skapti.

### Fyrstur at hava urtagarðsbrúk sum vinnu

Hann var hin fyrsti her á landi, ið fekk sær urtagarðsbrúk sum yrki burturav, og hetta eydnaðist helst betur, enn hann sjálvur ella nakar annar hevði væntað. Hann hevur til fulnar víst, hvat fáast kann burtur úr jørðini hjá okkum. Og tað sló ongantíð feil við grøðini. Hann fekk væl burturúr sínum arbeiði og varð tí eisini ein góður skattaborgari!

Tað hevur verið eitt rættiligt frambrot tá í tíðini at fara undir urtagarðsbrúk, tí hvør skuldi keypa? Í fyrsta umfari vóru tað embætisfólkini í Havn, sum frá sínum uppruna, vóru "betur vand" enn føroyingar á einum øki sum hesum. Men sum frá leið vórðu pottaplantur o.a. send út á bygd. Verdóttrin Elisabeth, sum er av Strondum, minnist sum smágenta, at tey keyptu rabarbur úr Kirkjubø. Tað, sum var eitt eyðkenni fyri Gazet, var eisini, at øll vøran skuldi pakkast virðisliga inn, tí innpakningurin skuldi samsvara við innihaldið. Hetta minnir nógv um nútímans marknaðarføring. Undir krígnum varð nógv selt til bretsku hermenninar.

Í urtagarðsvirksemi var einki, sum var ein sjálvfylgja. Her skuldi nógv kanningarabeiði gerast, so Gazet hevði blómur alla staðni í húsinum og ikki minst uppi á loftinum. Upprunaliga var einki sum kallaðist drívhús. Byrjað varð við "hitasengur", har undirlagið var rossatøð og blørutari, og síðan mold útyvir. Tá kom ilur í, og nú bar til at dyrka slíkt, sum annars ikki bar til.

### Fekk sær drívhús

Gazet fekk sær eitt lítið drívhús undir krígnum. At byrja við var tað uttan hita. Men seinni fingu tey sær kolhita, har fýrurin stóð uttanfyri.

Nú bar sum sagt til at dyrka annað enn tað vanliga. Byrjað varð við tomatum, sum vórðu seldar til handlar í Havn. Síðan komu gularøtur, persilla, leykur, purrur, summarblómur o.m.s.

Onkuntíð hevði Gazet



*Hetta er kallsmansbørkubóndin, ein av teimum forkunnugu plantunum, sum Gazet savnaði, og sum vit hava tikið mynd av á plantusavninum, har tað eru 213 plantur hjá Gazet. Greitt er frá hesum plantum í sjálvari greinini.*



*Ein onnur er villa rósan.*



*Og ein triðja er leggstutt fransagras.*

ein norskan gartnara at hjálpa sær. Vanliga fekst fræ úr Danmark. Hetta bar ikki til undir krígnum. Tá fekk hann fræ úr Bretlandi.

Annars fekk Gazet leykir úr Hollandi gjøgnum Louis Apol, hollendari, sum giftist til Norðradals. Gazet hevði nógv samband til Hollands.

Gazet át sjálvur mest tað, sum vaks úr jørðini, ávirkaður av tíðarandanum millum lærarar sínar á Malling landbúnaðarskúla. Men hetta var eisini orsakað av, at hann fyri heilsuna toldi ikki annað enn hetta.

Fyri at lætta um søluna fingu tey hjá Gazet sær blómuhandil í Havn. Blomsturbrá lat fyrst upp í Niels Finsensgøtu, og endaði í Bøgøta. Tað var dóttirin Elin, sum rak handilin. Hon fór niður at læra blómubinding. Nú er virksemið hildið uppat.

Umframt urtagarðsvirksemi fekk Gazet eisini seinni eitt tøkt festi, sum var 2,5 merkur, har hann hevði neyt og seyð, 20 áseyðir uppá mørkina. Tey høvdu tvey neyt, og hest høvdu tey eisini altíð.

### Tá Nella var í Kirkjubø

Í 2001 fylti Nella Lamhauge á Toftum 85 ár. Í hesum sambandi skrivaði dóttirin Louisa eina grein,



*Urtagarðurin er hildin væl av soninum Sámali, og soleiðis sær hann út í dag.*

har m.a. varð sagt frá, tá mamman var í urtagarðslæru hjá Gazet og Fridrikku. Vit endurgeva:

"Hvønn morgun byrjaði hon (mamman) við at mjólka neytunum á trøðni, sílaði mjólkina og vaskaði mjólkaríløtini. Tá tað var liðugt, var farið í urtagarðin. Har var hon restina av degnum. Har var úr at gera hjá Gazet. Sum tann ordans maður hann var, lærdi hann fólkið hjá sær at fara væl um amboðini, sum skuldu vaskast hvørt kvøld, so tey morgunin eftir stóðu nosslig og rein at taka í nýtslu aftur. Eingin hvíld var fyrr enn um kvøldið.

Nella minnist við gleði allan tann vakra vøkstur, sum Gazet fekk at grógva, og allar tær vøkru blómurnar í urtagarði og vakstarhúsum hansara. Einaferð hjálpti hon Gazet at fyrireika eina blómufram-sýning. Har var hópur av angandi blómum av øllum sløgum í øllum møguligum litum, sum varliga skuldu setast í blómukassar, so tey ikki skalaðust av teirri longu ferðini til Danmarkar, har blómuframsýningini skuldi verða. Ta tíð, hon varð har, lærdi hon nógv um blómur og annan vøkstur.

Og væl er lært. Tá Nella kemur aftur inn á Toftir, fer hon beinanvegin, saman við mammuni, at gera urtagarð við alskyns blómum, runnum og berjatrøum. Hesin urtagarður mundi teljast millum teir vakrastu í bygdini."

### Virdur um landamark

Sum serfrøðingur í plantufrøði var Gazet kendur og virdur langt út um landamark. Hann hevði brævaskifti við nógvar útlendskar vísindamenn, og ofta hevði hann vitjan í Kirkjubø av útlendingum, sum vildu síggja hansara verk.

Umframt urtirnar, var tað ivaleyst flogkyktini, sum høvdu hansara ans. Hann kendi tey út og inn, og hann lat eftir seg eitt vælskipað savn av skordýrum, sum tó fór fyri skjeyti seinni. Men nakað av tí hann savnaði er til á Zoologisk Museum í Keypmannahavn. Og vit eru fegin um at tað hevur eydnast okkum til hesa grein at fáa myndir av nøkrum av teimum skordjórum, sum Gazet sendi hagar, og sum framvegis eru har. Júst á hesum øki hevði Gazet eitt tætt samstav við Leif Dahl, sum var beiggi Paula Dahl. So Gazet nýtti nógva tíð at jagstra summarfuglar og annað flogkykt. Hetta var ikki nakað, sum øll dugdu at skilja. Onnkur speiskur velbastaðmaður hevði einaferð tikið til, at Gazet hevði nýtt ein heilan dag at kryvja ein grindalokk!

Zoologisk Museum sigur í dag um tilfarið teir fingu frá Gazet:

*I Zoologisk Museums samling af sommerfugle fra Færøerne opbevares enkelte eksemplarer indsamlet af G. Patursson. Det drejer sig om (i hvert fald) følgende arter: Acleris notana, Operophtera brumata, Phlogophora meticulosa og*



*Admirálur*



*Skreytvongur*



*Birkivevjari lítli*



*Frostspannari*

## Søgan um skordýrini

Vit hava fingið myndir av nøkrum av teimum skordjórum, sum Gazet sendi til Zoologisk Museum í Keypmannahavn. Vit takka teimum fyri vælvild og ómak. Skordjórini eru rættuliga væl varðveitt, tá hugsað verður um, at tey stava frá 1939-1948.

Jens Kjeld Jensen hevur gjørt okkum tann beina at geva eina frágreiðing um skordjórini, og hann kann enntá geva søguna um júst tey skordjórini sum eru á myndunum.

### Birkivevjari lítli
*– Acleris notana*

Gazet havde 2 larver i 1948, som han havde fundet i Kirkjubø. Det lykkedes ham at få dem til at forpuppe sig, og derefter at få dem klækket begge to – og det er netop den ene af disse, som I har fået fotografi af. Disse to fund var første fund af birkivevjari lítli på Færøerne.

Denne art er nu almindelig i Tórshavn.

### Admirálur
*– Vanessa atalanta*

Den første admirál, som blev fundet på Færøerne var i 1923 og den blev fanget ved "middle-clas school in Thorshavn"

Den første som blev fanget i Kirkjubøur af Gazet, blev fanget i 1945.

*Lýsing í Dimmalætting:*
### Flogið fevnir 58 mm

Admirálur finst í Norðuramerika, í øllum Europa, í Norðurafrika og heilt eystur til New Zealands. Hann er ein vanligur ferðafirvaldur, sum hevur vetrarvist í Suðureuropa. Tíðliga á vári flýgur hann norðureftir, og verpur egg í noturnar.

Admirálarnir sum koma flúgvandu higar á nærum hvørjum sumri eru helst klaktir sama summar. Stundum, tá veðrið er til vildar, verða somuleiðis "føroyskir" admirálar klaktir her á landi, men sum oftast eru føroysku sumrini ov køld og vát. Ormveran spinnur eitt notublað saman um seg og liggur so har fjálgt og turt. Admirálur sæst frá seinast í mei til november mánaða.

### Skreytvongur
*– Phlogophora meticulosa*

Dette eksemplar fra Kirkjubø er den første af denne art fundet på Færøerne i 1947.

Siden hen er den ofte fanget, og i dag yngler den ofte her!

### Frostspannari
*– Operophtera brumata*

Fundet første gang i Tórshavn ca. 1930, og første gang i Kirkjubø i 1939 (den på fotografiet).

Foruden disse 2 steder, er denne art yderligere kun fundet på Nólsoy. I Tórshavn er den meget almindelig i dag.

**Framhald á næstu síðu**

*Vanessa atalanta. På det tidspunkt, hvor disse blev indsamlet og foræret til museet, var kendskabet til Færøernes sommerfuglefauna stadig mangelfuldt, og der var derfor tale om fund af betydelig interesse. I de senere år har der været en stigende interesse for færøske sommerfugle (både fra dansk side og lokalt), og med moderne indsamlingsmetoder har de fleste af de arter, som G. Patursson fandt, vist sig at være regelmæssigt forekommende på Færøerne.*


*Urtagarðurin sæð móti kirkjuni. Frá vinstru síggjast: Hannemia, sum var gift við beiggja Fredrikku, Poul Titus. Síðan er tað Fredrikka og so Gazet sjálvur.*

## Fekk staðfest gullaks fyri 100 árum síðani

Tað ber til at lýsa hansara virksemi, tí sum sagt er til skjals brævaskifti á hesum øki, og hevur hetta serliga verið við Universitetets Zoologisk Museum í Keypmannahavn. Tað skilst á brævaskiftinum tá, at Gazet í fleiri førum, hevur verið førur fyri at skráseta flogkykt og summarfuglar í Føroyum, sum ikki eru skrásett frammanundan. Fyrsta brævið, sum er til skjals, snýr seg ikki um flogkykt, men um fisk, og enntá um ein sera aktuellan fisk, sum vit onnur halda vera "uppdagaðan" í okkara tíð.Tað er dagfest 22.9 1904, tá hevur Gazet bert verið 25 ára gamal, og ljóðar soleiðis:

*Kære G Patursson!*

*Den Fisk, som De saa meget tydeligt har tegnet, er en Glansfisk (Lampis Guttatus) af Makrel Familien. Det er en Dybhavs Fisk, der hører hjemme i det Nordlige Atlanterhav, men ret sjældent viser sig ved Kysterne, dog er den ikke mere sjælden, end at den har sit eget norske Navn, Laxstørje, og et islandsk Navn, Guldlax. For dette bidrag takker jeg Dem på Museets og egne vegne. Jeg har neddelt det til den Museumsassistent, Adolf Jensen, der netop er i færd med at samle Oplysninger om Fiskene omkring Færøerne, Island og Grønland.*

*Deres Ærbødige*
*Herluf Winge*

Tískil kunnu vit staðfesta, at gullaksur hevur verið kendur í Føroyum í 100 ár. Umrøddi Adolf Jensen gjørdist seinni ein kendur fiskifrøðingur.

## Brævaskifti um flogkykt

Vit fara at endurgeva nakað av tí brævaskifti, sum Gazet hevur havt í samband við hansara kanningar viðvíkjandi kyktum, og sum lýsir eitt virkisøki, sum er lítið kent.

Fyrst er tað ein kladda til eitt bræv sum Gazet í september 1966 sendi til Mag.scient.W Buck á Universitetets Zoologiske Museum. Her skrivar hann:

*Tak for Deres beredvillige svar på min henvendelse til museet. Kort tid efter afsendelsen af de to pupper til museet begyndte de genværende fire pupper klækningen, af disse fremkom der først en admiral og senere tre tidselfugle. Disse sidste sender jeg herved museet. Desuden sendes resterne af en sommerfugl fundet druknet i en vandbeholder indendørs 20.juni, måske kan den genkendes.*

*Mod slutningen af juni og til midt i juli måned var der mange sommerfugle her i bygden også admiraler og printed Lady, og jeg tænker mig, at der må have været et stort antal larver i de mange store nældebevoksninger her omkring, men at de er gået tilgrunde i efterårets storme, regn og kulde.*

*Venlig hilsen*
*O.G. Patursson*

Svarið er soljóðandi:

*Med taknemlighed har vi modtaget Deres brev og de to pupper. Den ene af dem var imidlertid klækket, og er forkrøblet eksemplar af en sommerfugl, på grund af den trange plads i æsken, var resultatet. Den var nu ikke svær at genkende, da det jo var den vi på dansk kalder "tidselfugl", Vanessa cardui L. Den anden puppe er stadig levende, og vi vil prøve at klække den. Det er jo en art, som er vidt udbredt næsten over hele jorden og samtidig en dygtig flyver. Ofte er de set trækkende i store flokke, også ud over havet, så det er naturligt nok, at den har fundet vej til Færøerne. Ikke desto mindre har vi kun to eksemplarer af denne art i den Færøske samling, et fra omkring 1865, og et fra 1939, begge fanget af læger. For øvrigt ser jeg, at vi har en admiral fra sommeren 1945, som De har sendt os. Vi håber også at måtte beholde disse to Tidselfugle til vores samling og siger Dem tak på forhånd.*

*Men venlig hilsen*
*W. Buch*

Annars sæst av brøvunum, sum liggja eftir Gazet, at hann í hvussu er hevur havt brævaskifti við Zoologisk museum aftur til 1919, tá hann hevur fingið eitt hondskrivað takkarbræv.

Í 1940-unum hevur hann liggjandi fleiri brøv, har Gazet verður takkaður fyri at senda summarfuglar og kykt inn hagar, og í fleiri førum er talan um kykt, sum ikki fyrr er staðfest í Føroyum. Tað er eingin ivi um, at her liggur eitt virðismikið íkast til at lýsa henda partin av føroysku náttúruni.

Í 1948 verður Gazet biðin um regluliga at senda kykt til savnið, og teir bjóða sær til at senda honum ta útgerð, sum skuldi til fyri at hetta kundi gerast til lítar.

Í 1963 boðar Leif Lyneborg frá Zoologisk Museum frá, at hann er við at gera eitt verk um "Færøernes Fluefauna".

## Vóru javnaðarfólk í Kirkjubø!

Kona Gazet var Fredrikka, sum var úr Kirkjubø. Tey bæði vóru trýmenningar. Systir hennara var Karin Samuelsen, sum var lærari m.a. á Hvítanesi, og sum var kend sum kærleikin hjá Hans A Djurhuus, sum hann ikki fekk. Fredrikka var 7 ár niðri, har hon ætlaði at gerast sjúkrasystir, men so langt kom tað ikki. Hon var øgiliga røsk og ein góð ungamamma, og hon fylgdi væl við í tí, sum gekk fyri seg í samfelagnum.

Tey bæði hjúnini skiltu seg á einum øki fullkomiliga burturúr restina av kirkjubøfólkunum. Tey vóru nevniliga javnaðarfólk og duldu ikki fyri tí heldur. Petur Mohr Dam var tískil eisini javnan á gátt. Hann gjørdi tó ongan háva av síni politisku støðutakan. Hetta verður bert nevnt fyri at undirstrika, at hjúnini bæði høvdu sína egnu støðu, eisini í politikki.

Børnini hjá teimum vóru Páll, Sámal, Elin, Hildibjørt og Sigrid.

## Eftirmælið hjá verdóttrini um Fredrikku

Tað vóru góð viðurskifti í familjuni. Sonurin, Sámal, búði saman við sínum húski áfast í húsini hjá Gazet. Verdótturin Elisabeth gevur vermóðrini hetta eftirmæli:

"Tá tað skal skrivast okkurt um Fridrikku, tá er tað ikki so lætt, hvar ein skal byrja. Nú er frammanundan skrivað um Gazet.Tað er fyri mítt viðkomandi nógv gott at skriva um tey bæði.

Fredrikka var ógvuliga gløgg. Henni dámdi væl at lesa, og hon skilti tað hon læs. Tað var ein frøði at fara inn á gólvið hjá teimum báðum. Fredrikka var skjót við drekkamunninum. Altíð var okkurt gott afturvið. Hon dugdi væl at baka og altíð var reinur dúkur á borðinum.

Fredrikka var á háskúla sum ung. Har lærdi hon mangt, sum ikki var so líka til at koma til í Føroyum. Henni dámdi væl at syngja. Hon hevði gott mál og dugdi væl av sangum og sálmum. At koma inn á gólvið hjá teimum, tá tey sótu við radio og lurtaðu eftir gudstænastu frá norðmanninum, tað var so hátíðarligt. Tá í tíðini var jú so nógv lurtað eftir Noreg.

Tað vóru nógv viðurskifti, sum høvdu hennara áhuga. Hon fylgdi væl við í politikki. Hon krógvaði ikki, hvar hon stóð. Tað andaliga hevði hennara stóra áhuga. Tað hevði hon heimanifrá. Fredrikka stóð væl undir liðuni á manninum. Hon hevði sum hann stóran áhuga í tí sum vaks, og hon gleddist nógv um urtagarðin, har eisini vóru vakrir krókar, har tað til bar at hugna sær.

Tá hugsað verður um at kunna liva av tí, ein urtagarður gevur, so er hetta ikki so lætt at skilja í dag. Eitt er púra vist, at dagarnir vóru mangan langir hjá øllum, sum hoyrdu til heimið.

Vit kunna ætla at viðhvørt vóru bakkøst, tí veðrið var ikki altíð til vildar. Her skal verða nevnt eitt dømi. Eitt árið vóru gularøturnar undankomnar, tá eitt illveður kom vestaneftir og allar gularøturnar fóru av sjóroki, sum rættuliga kann gera um seg í Kirkjubø. Tað árið blivu gularøturnar seinar, tí tað mátti sáast av nýggjum. Hetta er bert eitt dømi av fleiri um, hvussu tað kundi gangast. Tað skal tol og hugur til at fáast við slíkt, men spennandi er tað.

Fredrikka stóð væl undir liðini á manninum, eisini tá hugsað verður um, at Gazet var vegetar. Tað setti síni krøv til konuna, tí tað var jú hon, ið gjørdi matin. Tað tók hon sum sína skyldu. Men tað kundi vera eitt sindur trupult, tí í Kirkjubø var jú eingin handil, men við góðum vilja bar tað væl til.

Nógv gott kundi verið skrivað afturat. Tey eru fyri nógvum árum síðani farin undir grønu torvu. Sanniliga tvey sjáldsom fólk, mentafólk av tí góða gamla slagnum.

Friður veri við minninum.


*Her sæst verdótturin Bodil, sum var gift við Páll hjá Gazet, við einum pokali, sum Gazet vann á "6. nordiske haveudstilling", sum var í Keypmannahavn í 1937.*


*Tann fyrsti sum fekk staðfest gullaks undir Føroyum var Gazet Patursson.*



*Hendan myndin er helst frá høvuðsframsýningini í bátahøllini á Debesartrøð í 1952. Framsýningin var í sambandi við, at løgtingið varð 100 ár. Prýðið fremst á myndini er sett upp av Gazet.*



*Her sæst Fredrikka á ungum árum saman við beiggja sínum Sámal Edil. Sámal Edil fórst sum ungur á sjónum.*



*Gazet í urtagarðinum.*

***Elisabeth***

Helt ólavsøku við hús Gazet hevði tað prinsipp, at hann arbeiddi ikki sunnudag. Tá fór hann í pussið, men fór kortini í urtagarðin og pilkaði okkurt ókrút. Tey bæði hildu ólavsøku heima hjá sær sjálvum. Tey pyntaða seg uttan at fara til Havnar, tí onkur kundi jú koma inn á gólvið. Tað kundi eisini henda, at tey bæði fóru í Hólmin á ólavsøku.

Hvørt háskúlaskeið kom vitjan og varð víst runt í urtagarðinum. Tað komu nógvir aðrir gestir eisini. Gazer tók gjarna ímóti gestum, men hann fór ikki út til onnur. Honum dámdi sera væl at lesa, og at loysa krossorðagátur, eisini tá hann ikki kundi sova.

Niels Winther Poulsen gav Gazet tað ummæli, at "við honum er ein merkismaður farin. Lítillátin og stillførur var hann allar sínar dagar, men tó hevur hann sett sær spor, sum seint verða tilgrógvin."

Hann var ein av teimum, sum fyrireikaðu seg til endan. Tann 3. nov. 1969 boðar hann Zoologisk museum, at nú hann er farin at eldast, hann var tá 90 ár, hevur hann ikki orku til at hugsa meira um at senda teimum summarfuglar.

Hertil svarar Niels L. Wolf:

*"Mange tak for Deres venlige brev af 3.ds. De gør slet ikke indtryk af, at alderen trykker Dem.*

*Men hvis De helst vil være fri for at tænke mere på sommerfugle, vil jeg blot takke Dem for den interesse, De altid har vist for dem, og for Deres gode bidrag til kendskabet om Færøernes sommerfugle."*

Tá hann doyði var hann liðugur at vára, honum longdist bert eftir lýkku. Kvøldið fyri, sum hann andaðist, kom lýregn. Hetta fegnaðist hann um, so ússaligur hann var, og hann helt fyri, at "Nú fara morgunfrúurnar at næla."

Sámal og Elisabth merktu, at nú var endin nær, so tey sendu síni trý børn inn til abban at geva honum ein serligan koss.

Um náttina fór hann, men um morgunin vísti tað seg, at morgunfrúurnar nældu. Hesa ferð kom hann ikki at gleða seg uppi yvir teimum. Hann var farin inn til eina størri gleði.

Hann var andsfrískur til tað síðsta og fylgdi livandi við í øllum, sum fyrifórst til tað seinasta.

Gazet varð heiðraður fyri sítt framúrskarandi virki m.a. av landsstýrinum við heiðursmerki og av kongi við riddarakrossinum. Í 1949 fekk hann frá Føroya Løgting eina virðis- og sømdarpening uppá kr. 1.000, sum var heilt fitt av pengi tá í tíðini.

Víst var Gazet ein merkismaður, og vit eru fegin um møguleikan at hava givið honum hetta eftirmælið. Um onkur er sum veit meira um Gazet, enn tað vit hava havt her, vilja vit fegin frætta.



*Uttast t.h. er Fredrikka, næst henni systurin Karin og síðani hálvsysturin Sigrid. Fremst er mamman, Marianna.*



*Gazet.*



22/9 1904

Hr. G. Patursson!

*Hetta er brævið frá Universitetets Zoologiske Museum, har gullaksur fyrstu ferð verður staðfestur í Føroyum.*



FØROYA LØGTING

*Viðurkenning frá Føroya Løgtingi.*

## Minningarhaldið á Syðradali:

# 40 ár síðan Syðradalsbáturin "Kallur" gekk burtur

**Tann 1. november var eisini minningarhald á Syðradali á Kalsoynni, og var hetta serliga merkt av, at tað í ár eru 40 ár liðin, síðan báturin "Kallur" av Syðradali gekk burtur.**

**Røðari var Jákup Eli Østerø, og endurgeva vit hansara røðu:**



*Dánjal Danielsen.*



*Jóan Símun Danielsen.*



*Henry Danielsen.*

Góðir dagar á Syðradali

Tað er sera ymiskt hvussu vit uppfata tað, sum hendir rundan um okkum. Hetta er knýtt at, hvussu vit sjálvi hava tað inni í okkum sjálvum, og hvussu gomul vit eru.

Eg vil greiða frá eini hending, sum fór fram fyri 40 árum síðani. Onkur, sum er komin meira til árs, kundi greitt frá hendingini frá einum øðrum sjónarmiði. Men sum barn, bert 6 ára gamal, vil eg greiða frá henni, sum eitt barn upplivdi tað.

Eg minnist góðar dagar yvir á Syðradali, hvussu hetta bygdalívið var eyðkent av samanhaldi. Eisini, hvussu dagligdagurin var sermerktur av, at børnini tóku lut í øllum, sum fór fram. Tað var ikki bert á skúlabeinki, at vit fingu útbúgvingina, men eisini í tí dagliga arbeiðinum. Av heusm fekk ein eina serliga kenslu av, hvat tað var at vera á eini bygd sum hesari.

Serliga minnist eg løtur í hoyggingartíð uppi við Revagarðin, tá tú kundi síggja alt bygdafólkið, sum tókst við at hoyggja. Hetta sermerkti bygdalagið, at øll vistu hvat fór fram og tóku lut í tí.

Var tað ein fjalldagur, so bíðaðu øll spent eftir, nær fjallbáturin kom undan høvdanum, og síðan samlaðust øll niðri á brúnni fyri at fregnast, hvussu gingist hevði. Soleiðis stóð øll bygdin saman um tað, sum gjørt varð.

Tá sjógvurin skuldi troytast, vóru tað eisini ríkar løtur, tá fleiri bátar blivu flotaðir, og menn fóru út á hav at søkja tað, sum okkum tørvaði.

Ein dagin hugdi eg oman á brúnna. Tá sá eg nakrar ungar menn stilla nakrar tunnur upp. Síðan fóru teir upp á tunnurnar og lupu so á sjógv, og vístu síni kynstur har.

Av øllum hesum, sum ein upplivdi, gjørdi eg mær eina mynd av teimum menniskjum, sum búðu har. At tey kundi og kláraðu alt, og eingin kundu steðga teimum. Eg hevði fult álit á teimum. Soleiðis sá eg hesi menniskju og hesa bygd, og tí havi eg serliga góð minni higani, og fara tey ongantíð burtur aftur. Hoyggingartíðir, fjalltíðir, tá bátarnir vóru flotaðir, og tá sluppirnar løgdu at kajendanum, tá tær komu og fóru. Dýrabar minni. Lívsins skúli. Tað eri eg glaður fyri.

Sorgardagurin

Sum eg nevndi, hugsaði eg, at einki kundi steðga hesum monnum, inntil ein dagin eg uppdagaði, at soleiðis var ikki. Hendan dagin tann 23. september 1963 gekk tað upp fyri mær, at tað var okkurt sum kundi steðga okkum á okkara lívsleið. Hendan dagin lá nakað óhugnaligt yvir bygdini. Tá var ikki so vanligt at fortelja alt fyri børnum. Men eg minnist henda ófrættadámin, sum lá yvir bygdini. Ongantíð áður hevði eg sæð tey vaksnu grátið sum børn fyrr enn tann dagin.

Tá fekk eg at síggja, at vit eru ikki altvaldandi menniskju, men tað er ein, sum kann steðga okkum. "Dimmalætting" skrivar soleiðis um hendan tilburð hin 25. september 1963:

"Maskinbátur úr Syðradali horvin á útróðri.

Hóast dúglig leiting av skipum og flogførum er 6-mannafarið "Kallur" við 3 monnum ikki aftur í aftur komið.

Síðani á miðdegi mánadagin og allan gjár hava skip og bátar leitað eftir 6-mannafarinum "Kallur" úr Syðradali við trimum monnum, sum farnir vóru av Klaksvík um kl 02 náttina millum sunnudag og mána. Teir høvdu fingið sær agn í Klaksvík og ætlaðu at stima norð um Kallin við línu.

Seinast, ið báturin – hvítur við grønum stokkum og við hvítum stýrhúsi – er sæddur var, mánadagin fyrrapartin um 11-tíðina, tá ið bátur úr Oyndarfirði kom fram á hann millum Kallin og Funningsmúla. Syðradalsbáturin stimaði tá eftir kýki. Seinni eru 2 kýkar funnir út fyri Líðarmunna á Kallsoynni og 2 línutrog fyri Keldunum, og møguliga eru tey av saknaða bátinum.

Veðrið var toluligt, tá Syðradalsmenninir fóru til útróðrar, men sum dagurin leið vaks vindurin, og seinastu týsnáttina var óveður.

Í leitingini fyristílað av verjuskipinum "Vædderen" luttóku fleiri føroysk skip og útróðrarbátar, og Thorshavn radio hevði alla tíðina samband við tey og leiðbeindi tey. Einahelst var leitað í Djúpunum, men eisini norðanfyri og sunnanfyri. Millum skip, ið leitaðu, vóru Víkingur, Pride, Stella Maria, Lishøvdi, Nevið Reyða, verjuskipið Teistin, norska bjargingarskipið Skomvær II, Havnatindur og Pálsdrangur. Og í gjár sendi "Vædderen" upp helikoptara sín, eins og flogfar frá eingilsku strondverjuni, Coast Guard, tók lut í leitingini, sum helt fram allan dagin í gjár.

Enn í gjárkvøldið var tíverri leitað til einkis.

Við 6-mannafarinum vóru teir tríggir: Daniel Danielsen, 67 ára gamal, giftur og pápi at fleiri børnum, sonur hansara Joen Simon Danielsen, 29 ár, giftur, og pápi at 4 mánaðar gomlum barni, og systkinabarn hansara Henry Danielsen, 30 ár og ógiftur."

Troystin í erva

Hetta var ein hending, eg ongantíð komi at gloyma. Hevði kent ein tryggan barndóm, men nú var alt merkt av ótryggleika og vónloysi, sum ikki kann greiðast frá. Hetta førdi við sær, at eg fór at leita eftir Honum, sum er sterkari enn eg.

Ja, mangan tørvar okkum at uppliva hetta vónloysi fyri veruliga at leita til Hann, sum kann hjálpa okkum. Eina løtu sum hesa, tá vit minnast teir, sum farnir eru, kann eg bíta merki í, at vit øll blíva líka, tá vit standa andlit til andlit við deyðan. Tá er eingin munur, um tú ert barn ella vaksin, hvussu tær hevur gingist í lívinum, væl ella illa. Tað er heldur eingin munur hvønn trúarbólk, tú hoyrir til.

Nei, andlit til andlit við deyðan er bert eitt sum telur, og tað er hetta: "Hvat havi eg gjørt við Jesus?" Tað er bert ein persónur, sum hevur vunnið á deyðanum, og tað er Jesus, og tí vil eg halga hesa løtu serstakliga til Hansara, so hetta kann ikki bert vera ein sorgarløta, men ein gleðiløta. Hetta er tað, sum er vón okkara, Jesus Kristus. Tá vit byrja lívið eru vit hjálparleys. Sum nýføðingur hava vit brúk fyri, at onkur tekur sær av okkum, og tá vit skulu inn í deyðan, hava vit eisini brúk fyri, at onkur tekur sær av okkum. Og hetta er tað einasta, sum kann bjarga okkum. Tí vit eru øll hjálparleys.

Serliga verða vit mint um tað eina hending sum hesa, tá havið tók tað besta frá okkum. Tá er gott at eiga Hann, sum ikki kann takast frá okkum. Okkara støða yvir fyri Honum kemur at avgera, hvar vit eru í ævinleikanum. Eiga vit hann sum vin, Jesus Kristus, so eru vit saman við honum. So kann havið ikki gera nakað við okkum. Heldur ikki deyðin, tí deyðin er farin.

Eg vil nú biðja eina bøn til Gud: "Góði Faðir í Himli, eg biði Teg um, at Tú vil signa henda boðskap til okkum. At Tú vil troysta tey sum syrgja. Og nú vit fara at lesa nøvnini á teimum, sum farin eru hetta seinasta árið, vilja vit heita á Teg um at vera við okkum hesa løtu. Styrk okkum gjøgnum tað, sum fer fram. Eg biði teg í Tínum navni. Amen.



*Røðari, á minningarhaldinum á Syðradali á Kalsoynni, var Jákup Eli Østerø.*

# Søgan um eina føroyska húgvu

**Í íslendska blaðnum "Víkingur" hava vit funnið eina fitta søgu um eina føroyska húgvu. "Víkingur" verður givin út av íslendska yvirmannafelagnum Farmanna- og Fiskimannasamband Íslands, sum FF hevur havt nógv viðurskifti við í mong ár. Blaðið kemur út fýra ferðir árliga. Hendan frásøgnin stóð í blaði nr. 3 fyri 2003.**

Greinin um føroysku húgvuna er løtt at lesa, og tí endurgeva vit hana, sum hon er skrivað, men fara vit tó at gera ein samandrátt. Søgan snýr seg um Vilmund Bernharð Kristjánsson, sum er føddur í 1901, og tað er abbasonur hansara við sama navni, sum hevur skrivað frásøgnina.

Vilmundur hevur í 1936-37 verið við føroysku sluppini "Svínoy". Vilmund var maskinmeistari av yrki og flutti ungur til Vestmannaoyggjar. Her kom hann at kenna føroyingar og var við til at læra teir at fiska við gørnum, og tað var í hesum sambandi, at hann var við "Svínoy". Her kom hann at kenna føroyingar serliga væl, og tað var serstakliga ein teirra, hann gjørdist vinur við. Vilmund segði so einaferð við sín føroyska vin, at honum líktist sera væl á hansara føroysku húgvu, sum hann helt vera so "skemtiliga", og hann kundi hugsað sær at átt eina slíka. Hetta varð eisini lovað honum. Teir høvdu annars nógv felags áhugamál, og aftaná tíðina við "Svínoy" høvdu teir samband sínámillum.

Men sum ofta er, so helt hetta samband uppat, sum frá leið. Teir báðir hava havt nóg mikið um at vera av øðrum, og samskiftismøguleikarnir hava heldur ikki verið sum í dag.

Pakki kemur

Men ein dagin, langt eftir hetta, fær Vilmundur boð frá posthúsinum um, at her liggur ein pakki til hansara. Hann skundar sær eftir pakkanum, og stór var hansara undran, tá hann pakkaði upp. Her lá ein føroysk húgva og eitt bræv. Tað var skrivað av systir til hansara gamla føroyska vin. Hann var deyður nú, men á deyðalegu síni hevði hann biðið systir sína um at senda Vilmundi sína føroyska húgvu, tí hetta hevði hann lovað honum, tá teir vóru saman. Og tað lá honum á sinni, nú hann lá til tað síðsta, at halda lyftið. Systirin greiddu eisini frá lívinum hjá beiggjanum, eftir at teir báðir høvdu verið saman. Hann hevði ligið sjúkur leingi, og tað hevði verið umráðandi hjá honum at halda sítt lyfti til vinmannin, áðrenn hann fór av foldum. Systirin vildi fremja lyftið.

Húgvan varð goymd sum reyðargull og fylgdi Vilmund eisini, tá hann flutti úr aftur Vestmannaoyggjunum. Hann gjørdist fyrst bóndi á meginlandinum, og at enda búsettist hann á Hafnafjørðinum. Hann doyði í 1964. Síðan varðveitti kona hansara húgvuna, til hon doyði í 1988.

Nú hevur abbasonurin og navnin, Vilmundur Kristjánsson, húgvuna undir hond. Hann hevur sett hana í rammu, og hon hongur á stovuvegginum hjá honum.

Sigast kann, at hendan søgan er eitt vakurt íkast um tað aldargamla samband, sum hevur verið millum føroyingar og íslendingar, og sum vit hava havt so nógvar frásagnir um her í blaðnum.

Spurningurin er nú, um nakar føroyingur kennist við hesa søgu. Tað kundi verið stuttligt, um onkur av okkara lesarum veit, hvør hesi føroyski fiskimaðurin er. Í so fall vilja vit fegin frætta!



Vilmundur Kristjánsson

Færeyska húfan

Faðir minn sagði mér eitt sinn sögu sem mér fannst svolítið merkileg. Hún var um færeyska húfu sem föðurafi minn átti en ég er alnafni hans. Aldrei kynntist ég honum í raun því afi fékk hjartaslag og dó er ég var þriggja ára. Hann hét Vilmundur Bernharð Kristjánsson, og var fæddur 6. mars 1901 á Einarsstöðum í Glæsibæjarhreppi í Eyjafirði.

Afi, Vilmundur Bernharð Kristjánsson, nýútskrifaður vélstjóri.

En kannski er réttara að segja fyrst frá aðdragandanum að frásögn pabba. Amma dó eftir nokkuð langa sjúkrahússlegu og eftir jarðarför hennar voru hann og systkini hans að skipta búinu milli sín. Ýmsu smálegu átti að henda en hann hirti margt smátt og meðan annars þessa húfu því hann mundi aðdraganda þess að afi eignaðist hana. Hún lá svo lengi með ýmsu öðru smádóti niðri í skúffu hjá honum.

Er ég flutti að heiman og keypti mína fyrstu íbúð, gaf pabbi mér húfuna góðu. Ég hengdi hana upp á vegg og gerði ekkert meira í þessu húfumáli. Svo var það í fertugsafmælinu mínu að okkur pabba varð reikað inn í herbergið þar sem húfan hékk. Loksins eftir 9 ára gleymsku mundi ég eftir að spyrja pabba að því hvaða saga væri bak við húfuna. Og þetta var það sem hann sagði mér.

Vilmundur afi hafði sem ungur maður, sennilega á árunum 1936-7, verið tvær vertíðir á litlilli þrímastraðri skútu frá Færeyjum sem hét Svínoy. Hann flutti til Vestmannaeyja 1925, tók þar minna motor/vélstjórapróf 1926 og mun hafa tekið smáskipapróf einnig. Meðan hann var í Vestmannaeyjum keypti hann fjórðungs hlut í bát sem hét Friðþjófur. Á þessum árum starfaði hann m.a. sem vélstjóri og stýrimaður á ýmsum Vestmannaeyjabátum en fór svo að kenna Færeyingum þorskanetaveiði. Með honum var Sigurður nokkur frá Skuld í Vestmannaeyjum en hann var eitthvað styttra þar úti. Aflabrögð Færeyinga á þeim tíma voru víst ansi frumstæð, veiddu þeir þá mest á færi og kunnu lítið með net að fara. Fiskaði Svínoy eitthvað hér við land en sigldi svo til Færeyja með aflann og hélt síðan áfram veiðunum þar. Ekki veit ég hvaðan hún var gerð út en hvað um það, þar var þó afi.

Böggull í pósti

Í þessi tvö ár var afi þarna til sjós og kynntist nokkrum Færeyingum ansi vel. Sérstaklega var það þó einn þeirra sem hann kynntist sérlega vel og varð þeim vel til vina. Ég get vel ímyndað mér að þeir hafi farið saman út að skemmta sér og kíkt í glas, farið á hljómleika, lesið sömu bækurnar og jafnvel kíkt í bíó ef slíkt fyrirbæri var þá til í Færeyjum á þeim tíma.

Afi orðaði það eitt sinn við Færeyinginn að honum fyndist húfurnar þeirra skemmtilegar og honum langaði að eignast eina. Færeyingurinn lofaði að verða honum út um eina við tækifæri. Þar sem þeir voru orðnir þetta góðir vinir þá héldu þeir sambandi skrifleiðis er afi kom aftur hingað heim.

Afi hafði fyrir fjórum börnum að sjá og lífið á þeim tíma var hreint ekki auðvelt. Hann var á ýmsum Vestmanneyjabátum og því löngum að heiman. Sennilega hefur þetta verið svipað hjá Færeyingnum. Með tímanum slitnaði því sambandið.

Eitt sinn löngu síðar þegar afi er í landi fær hann senda tilkynningu um að hann eigi böggul niðri á pósthúsi. Hann tölti að sjálfsögðu af stað og sótti böggulinn. Og mikil var undrun hans er hann opnaði hann. Þar lá þessi húfa og bréf með. Í bréfinu skrifaði systir þessa forna vinar hans að er vinurinn lá á dánarbeði sínu einhverjum mánuðum fyrr hafði hann beðið hana að hafa uppi á afa mínum og senda honum húfuna. Hann sagðist hafa lofað honum húfunni. Nú vildi hann efna loforðið og launa honum vinskapinn þó slitnað hafi upp úr með tímanum. Svo hún hafði uppi á afa og sendi honum húfuna. Hún sagði honum upp og ofan um lífshlaup vinarins, hann hafði veikst alvarlega og legið lengi veikur og nú vildi hann ljúka sínum málum.

Árið 1941 eða 1942 fluttist afi norður í Fljót, gerðist bóndi og bjó fyrst að Brekku hjá bróðir sínum en svo á Illugastöðum. Illugastaðir eru stutt frá gatnamótunum þar sem vegurinn að sunnan greinist í tvennt, annarsvegar til Siglufjarðar en hinsvegar yfir Lágheiði til Ólafsfjarðar. Árið 1953 flyst hann svo suður til Hafnarfjarðar með fjölskylduna, gerist verkamaður og bjó þar til æviloka. Við sérstök tækifæri fengu börnin stundum (pabbi þar á meðal) að setja húfuna upp. Afi Vilmundur lést svo 6. júní 1964. Afa þótti svo vænt um hana að hún fylgdi honum alla þessa flutningana og til dauðadags, vafin í smjörpappír til að verja hana hnjaski. Þannig geymdi amma hana líka þar til árið 1988 að hún dó einnig.

Húfan hangir nú á veggnum hjá mér, orðin rúmlega 60 ára gömul. Oft verður mér litið á hana og hugsa þá til afa. Hún er dýrmætasta minning mín um hann, ásamt ljósmynd sem ég á af honum. Já, húfan hans afa er fundað gull í huga mínum.

Húfan góða frá Færeyjum.

Heimildir:
Kristján Vilmundarson, munnleg heimild.
Guðni Vilmundarson, munnleg heimild.
Ásta Vilmundardóttir, munnleg heimild.
Vélstjóratal.

*Greinin hjá Vilmundi Bernharð Kristjánsson í heilum líki, sum hon varð prentað í "Víkingur".*



*Søgan um føroysku húgvuna byrjar umborð á "Svínoy". "Svínoy" varð keypt til Føroya í 1926 av Jóan Jakku, Jens Klæminti og Jákupi hjá Jensi. Jákup átti helvtina, hinir hvør sín fjórðing. Seinni kom Jens Klæmint at eiga skipið einsamallur. Hon var nakað væl størri enn sluppirnar, og nógv longri enn nakað av hinum skipunum, hevði norskt snið og bygd til íshavsskútu, men motorurin var ikki góður, so hon fór ikki til Grønlands fyrr enn í 1929.*

*Sambært hesi søgu hevur "Svínoy" verið undangonguskip, tá talan er um garnaveiðu.*

**Vitja heimasíðuna www.fiskimannafelag.fo**

## Ummæli:

# Sigling og Útbúgving

**Millum tær nógvu bøkurnar, sum eru komnar út um okkara fiskivinnu- og siglingarsøgu, er eisini fyrri partur av Sigling og Útbúgving, sum er skrivað av Óla Olsen.**




*Hesin skiparin, sum tekur sólarhæddina er Sigurd Andreasen (1903-1951). Hann var ættaður av Eiði men búsitandi í Lorvík.*

Óli veit í hvussu er, hvat hann tosar um, tá talan er um sigling og fiskiskap. Hann er uppvaksin í einum útróðrarumhvøri. Hann hevur verið til skips. Síðan fór hann uppá skúla og so út at sigla. Síðan tók hann læraraprógv og gjørdist lærari á sjómansskúlanum, til hann fór at skriva um skip!

Alt hetta man hava givið honum íblástur til at kortleggja okkara søgu á økinum. Fyrst og fremst man hann vera kendur fyri sínar søguligu frásagnir um okkara skipasøgu í Dimmalætting.

Vit vita av egnum royndum, at alt hetta kann vera eitt drúgt arbeiði. Men so mikið stuttligari er tað, tá úrslitið liggur á borðinum. Tað skal eisini sigast, at hetta er eitt øki, sum fólk hava stóran áhuga fyri, og sum verður lisið fram um annað tilfar.

Bókin hjá Óla snýr seg um sigling og útbúgving, og hetta skuldi í sær sjálvum havt áhuga hjá øllum, og ikki minst hjá teimum sum hava "sjógv í æðrunum". Tó skal sigast, at júst hendan bókin vendir sær til ein meira avmarkaðan lesaraskara, tí hon snýr seg í høvuðsheitum "bert" um siglingarfrøði og navigatørútbúgving.

### Spennandi evni

Hetta er tó eitt sera spennandi øki. Her fáa vit fyrst greitt frá tí søguliga, hvussu menn funnu millum lond, áðrenn nakað



*Óli Olsen.*

var sum æt kumpass. Síðan er frágreiðing um fornan føroyskan sjómansskap. Eitt kapittul er um úbúgving í siglingarfrøði í danska ríkunum, og síðan um siglingarlæru í Føroyum.

Hetta er eisini sera forvitnisligur lestur. Frálæran byrjar við Mads Christian Winther, sjómaður, sum er føddur í Horsens í 1748. Hann finnur eina føroyska gentu og kemur at búgva í Føroyum og hervið førdi Winther navnið til Føroyar. Tað var hann sum lærdi Nólsoyar Páll siglingarfrøði! Fleiri onnur nøvn er í hesum sambandi, men um aldarskifti fara menn, sum eru skiparar, at læra frá sær, og var hetta grundarlagið fyri teirri útbúgvingarskipan, sum vit hava í dag.

Teir, sum kanska settu størstu spor eftir seg á hesum økinum, vóru Jens í Dali og sonur hansara Jens Pauli í Dali. Og sigast má, at Jens í Dali er tann mest spennandi persónurin í allari hesi søgu. Hann hevur verð ein framúr framburðsmaður á fleiri økjum. Tað sama kann sigast um hinar "í Dali". Vit hava havt frásøgn um hendan partin av sjómansskúlasøguni her í blaðnum. Tað er ikki allur dramatikkurin, sum er komin við í bókina hjá Óla, sum viðurskiftini við teir donski missiónsmenninar Viggo Ryving Jensen og Anders Nielsen, sum bygdu tað, vit í dag kenna sum "gamla sjómansskúlan". Men tað er kanska líka frætt ikki at grava slíkt upp aftur 100 ár aftaná.

Onkrar konfliktir hava verið við danskar myndugleikar á økinum, men kortini ikki so nógv, sum á so nógvum øðrum økjum. Men kortini hava verið hendingar, har tað var greitt talan um danska sjikanu við próvtøkuna. Men vit kunnu troysta okkum við, at hetta er søga.

### 1000 skiparar

Aftast í bókini er eitt yvirlit yvir allar teir, sum hava tikið prógv fram til 1928. Teir eru fleiri enn 1000, og er hetta eitt ótrúliga stórt tal, tá hugsað verður um fólkatalið annars. Teir sum hava tikið prógv eftir hetta, man vera fleiri ferðir so nógv. Tískil er eingin ivi um, at vit hava havt og hava eina væl útbúna manning á okkara skipum.

Alt í alt er her talan um eina væla bók, sum er spennandi lesnaður hjá øllum sjóvinnuáhugaðum.

Sumt av tilfarinum, sum t.d. reglugerðir o.t., er turrisligur lesnaður. Hetta kundi verið sum eitt skjal aftast í bókini. Her er heldur einki indeks við leitiorðum. Men hetta kann náast til seinnu bókina. Tað er eingin ivi um, at eitt slíkt økir munandi um virðið á eini slíkari bók.

### Kennir nakar stjørnukortið

Vit fara í hesum sambandi, at nýta høvið til at spyrja enn einaferð, um nakar kennist við stjørnukortið, sum vit endurgeva mynd av. Vit høvdu fyrispurningin í blaði nr. 301. Eggert Hansen, búsitandi í Nólsoy, hevði kortið frá abba sínum Hanus hjá Malenu av Tvøroyri. Hann var skipari seinnapartin av 19. øld og fyrst í 20. øld. Og hann átti eitt slíkt stjørnukort. Men tað var eingin sum kundi siga okkum meira frá tí.

Men nú spyrja vit eina ferð enn. Kennir nakar til stjørnukortið, verður viðkomandi biðin um at venda sær til okkara.

Vit vilja annars geva bókini Sigling og Útbúgving besta viðmæli.



*Kennir nakar stjørnukortið?*



*Jens og Maria í Dali við børnunum aftast f.v. Hillebert, Johanna Elisabeth og Jens Pauli.*



*Bestimaður á Sigurfarinum Jákup Andreas Heinesen úr Kunoy. Hann gjørdist seinni sera kendur sum skiparin á Britons Pride.*

# Óli Samró í Hollandi

**Sum kunnugt hevur Óli Samró, sum m.a. er formaður í fiskidagaskipanini, fingið eina avbjóðing á altjóða støði. Hann býr fyri tíðina í Haag í Hollandi, har hann er við í eini verkætlan, har endamálið er at sammeta tær fiskiveiðiskipanir, sum tey ymisku londini hava. Hetta merkir, at vit nú fáa eina almenna sammeting av okkara fiskidagaskipan við ta kvotaskipan, sum tey flestu londini annars nýta.**



*Her sæst Óli saman við sínum baklandi.*

Tað eru fiskivinnulondini í ES, sum saman við londunum í norðuratlantshavi og baltalondunum, ið hava tikið seg saman um eina verkætlan at finna felags mát fyri hugtøkunum: Kapasitetur, veiðitrýst, burðardygg veiða, lønsemi og búskaparlig burðardygd.

Tað er hesi ætlan, sum Óli nú arbeiðir við. Óli hevur verið við í einum arbeiðsbólki av búskaparfrøðingum frá 20 fiskiveiðilondum í Evropa, sum umboða umleið 246.000 fiskimenn. Endamálið við hesum bólki hevur, sum sagt, verið at fáa til vega hagtøl, sum kunnu sammetast frá landi til land. Og slík hagtøl eru eisini neyðug, fyri at kunnu sammeta tær ymisku reguleringsskipaninar, sum tey ymisku londini hava.

Upprunin til hugskotið, at sammeta tær ymsu fiskiveiðiskipaninar, komu á einum fundi í FAO, matvørustovninum hjá ST, har ein serfrøðingur førdi fram, at einasta nýtiliga reguleringsskipan var ein kvotaskipan. Serfrøðingurin førdi eisini fram, at víst høvdu summi lond havt fiskidagaskipan, men "ein slík skipan var ein ómøguligheit".

Óli var á fundinum og hevði, sum rímiligt er, eina heilt aðra fatan. Og hetta er endað við, at hann í summar fór til Haag í Hollandi, har hann skal hava sum høvuðsuppgávu at vera við í eini verkætlan, har endamálið er at savna saman tilfar, sum skal nýtast til eina sammeting av teimum ymisku skipanunum. Hetta er ein uppgávu, sum í fyrsta umfari fer at taka ein 2-3 ár.

Men Óli er so væl fyri, at viðvíkjandi Føroyum hevur hann longu góð tøl at arbeiða við. Og her tekur hann serliga til tølini hjá p/f Beta og hjá Føroya Fiskimannafelag sum framúr grundarlag fyri arbeiðinum.

Henda verkætlan verður m.a. fíggjað av Nordisk Ministerråd. Óli hevur ein fylgibólk í Føroyum, sum kann stuðla honum við tilfari, og har hann kann leita sær ráð. Í hesum fylgibólki eru Olaf Olsen, Jákup Sólstein og Óli Jacobsen.

Óli hevur júst verið í Føroyum, har hann m.a. hevur havt fund við fylgibólkin. Sum skilst hevur gingist væl í Hollandi. Arbeiðið gongur sum ætlað, og familjan trívist væl. Haag hevur annars eitt serligt altjóða umhvørvi. Tað eru heili 40% av fólkinum, sum eru útlendingar, so tað ber til at fáa íblástur nógvar staðni frá.

### Altjóða ráðstevna í Føroyum

Í samband við hesa verkætlan, er ætlanin at skipa fyri eini millumtjóða ráðstevnu í Føroyum 4.juni komandi ár. Heitið á stevnuni er:

**Reguleringsskipanir – samsvarar teori við veruleikan?**

Vertir fyri ráðstevnuna verða føroyski fiskimálaráðharrin og FAREC, sum er fyritøkan hjá Óla Samró.

Ætlanin er at Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, skal opna stevnuna og orðstýrari verður Árni Olafsson "okkara maður" í danska uttanríkisráðnum.

Ætlanin er at hava eina fjølbroytta útendska umboðan. Millum hesar verða fiskimálaráðharrarnir í norðurlondum, og umboð fyri ES, ICES og FAO, sum er matvørustovnurin hjá ST, sum hevur eina serliga fiksivinnudeild.

Evnið á fundinum verður "ein praktisk lýsing av, hvussu tær ymisku skipanirnar við veiðuregulering ávirka lønsemið í vinnuni".



*Menakhem Ben-Yami, upprunaliga fiskimaður, nú altjóða viðurkendur serfrøðingur, verður við á ráðstevnuni.*

### Fiskimaður frá Ísrael

Her verða nógvar "kanónir" av ymiskum slag. Men tað sum vit halda vera so nýskapandi er, at her verður eisini ein fiskimaður, og tað enntá frá Ísrael.

Talan er um Menakhem Ben-Yami, sum upprunaliga var fiskimaður. Í dag verður hann roknaður at vera ein sjálvlærdur fiskivinnuteknologur. Hetta hevur ført við sær, at Menakhem hevur havt ein hóp av álitisstørvum í Ísrael og í altjóða stovnum. Tann fremsti av hesum er FAO, sum ger eitt stórt arbeiði at menna fiskiskapin í menningarlondum. Hetta hevur ført fiskimannin Menakhem víða um, og hann hevur tískil royndir frá fiskiveiðu á øllum "sjey høvum". Hann er eisini skrivandi maður, og tað er frálíka gott skil á tí, sum hann hevur at føra fram. Umframt greinir hevur hann skrivað ritgerðir av øllum møguligum slag. Í 1996 gjørdist Menakham heiðursdoktari við lærda háskúlan í Kaliningrad.

So tað er ein royndur maður, sum kemur higar. Óli Jacobsen og hann hava annars hitst áður. Hetta var á eini IFISH stevnu um trygd og heilsu hjá fiskimonnum, sum varð hildin í USA í 2000.

Tað er neyvan ivi um, at tað verður meira at frætta frá Menakhem, tá hann kemur higar.

Vit fara at greiða nærri frá ráðstevnuni, tá hon fer at nærkast.

FF-blaðið | www.fiskimannafelag.fo

## Felagsformansval

**Í ár er felagsformansval í Føroya Fiskimannafelag. Um uppstilling og val sigur lóg felagsins:**

*Við vali av felags- og sýsluformonnum hevur hvør sókn rætt til at stilla upp ein mann. Við vali av felagsformanni hava eisini limirnir á teimum skipum, sum eru burtur, tá uppstillingin fer fram, rætt til at stilla upp ein mann. Maður er uppstillaður sum felagsformansevni, um 5 sóknir/skipsmanningar skjóta hann upp.*

*Valini eru loynilig og fara fram eftir reglum, sum felagsstjórnin ásetur. Skipast skal so fyri, at limir, sum eru burtur, meðan valið fer fram, skulu hava høvi til at greiða atkvøðu.*

*Atkvøðuseðlarnir verða sendir grannskoðara felagsins, sum telur atkvøðurnar upp.*

*Allir formenn verða valdir fyri trý ár í senn, og tekur valskeiðið við 1. februar.*

Felagsstjórnin hevur annars ásett hesar reglur fyri val:

*Viðvíkjandi uppstilling:*

a. Boð um uppstilling verða send sóknum og skipum fyrst í november. Fráboðanin fer eisini fram í FF-blaðnum.

b. Seinasta freist at boða frá uppstilling er 4. desember kl. 16, og skal uppstillingin vera váttað av sóknarformanni ella álitismanni hjá manningini.

c. *Viðvíkjandi vali:*
   a. Valrætt hava teir fiskimenn, sum hava goldið limagjald fyri 2002/2003, ella sum í 2003 eru mynstraðir og verða avroknaðir eftir sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag, tó skiparin undantikin.
   b. Felagsskrivstovan sendir áðrenn valið sóknarformonnum yvirlit yvir fiskimenn við atkvøðurætti.
   c. Á atkvøðuseðlinum verða prentað nøvnini á valevnum. Hesin skal koyrast í ein brævbjálva. Aftanfyri skal skrivast navn, bústaður, føðingardagur og seinasta skip og tíðarskeið, viðkomandi hevur verið við. Brævbjálvin skal sendast beinleiðis til grannskoðara felagsins.
   d. Sóknarformenninir skipa fyri valinum, soleiðis at teir býta atkvøðu- seðlarnar út til limirnar og so vítt gjørligt heinta teir. Í sóknum, har tað av praktiskum ella øðrum orsøkum ikki ber til at nýta hesa mannagongd, verða atkvøðuseðlarnir sendir beinleiðis til limirnar við postinum. Hesir senda teir beinleiðis aftur til grannskoðara felagsins.
   e. Har sóknarformenninir skipa fyri valinum verður samsýningin kr. 7 pr. fiskimann við atkvøðurætti.
   f. Atkvøðuseðlarnir skulu vera grannskoðara felagsins í hendi í seinasta lagi 30. januar.
   g. Fiskimenn, sum eru burtur, meðan valið fer fram, fáa atkvøðuseðil sendandi umborð.
   h. Mannagongdin við valinum verður lýst í bløðunum.

Føroya Fiskimannafelag

# Gunnar afturkomin til Gøtu sum lækni

Í vár høvdu vit eina samrøðu við tann tá virkandi kommunulæknanum í Gøtu læknadømi, Gunnar Bjørkman, sum var avloysari hjá Andreasi Petersen, sum annars er setti kommunulæknin í læknadøminum. Til seinasta val varð Andrias valdur á ting, og tað er lætt at ímynda sær, at tað at vera tingmaður, ikki minst á bygd, og kommunulækni má vera ringt at sameina.

Andrias valdi tískil at fáa sær farloyvi sum lækni í eitt hálvt ár, og í hansara stað kom Gunnar, sum er svenskari og kemur frá Gøteborg.



*Ditte og Gunnar inni á fiskimannafelagnum.*

### Væl dámdur lækni

Gunnar er ein fyrikomandi og dámligur maður, og hetta er eisini tað ummæli, hann fekk í Gøtu av teimum, sum eru í viðtalu hjá honum.

Men tann 1. apríl var tíðin hjá Gunnari úti í Gøtu, og hann og konan, Ditte, fóru aftur til Svøríkis.

Men Føroya-basillan man hava bitið seg fasta, tí eftir fáum mánaðum komu tey aftur og fingu eitt vikariat á Sandoynni.

Nú um dagarnar hittu vit Gunnar og Ditte á Havnargøtum, og komu tey inn á gólvið á Fiskimannafelagnum. Og nú eru tey komin aftur til Gøtu, tí Andreas hevur enn einaferð valt at taka farloyvi frá læknayrkinum, meðan mest er at gera í tinginum. Hesaferð búgva tey ikki í Norðragøtu sum seinast, men tey hava fingið innivist í Lorvík, men viðtalan er í Gøtudali.

Teimum dámdu væl á Sandoynni, men hetta er sera bundisligt. Eru tveir læknar, hava teir samdøgursvakt helvtina av tíðini. Tá er tað hóast alt frægari í Eysturoynni, har tað eru nógv fleiri læknar at skiftast um vaktirnar.

Tey bæði lata væl at, at búgva í Lorvík. Hendan dagin skuldu tey hava kalva til døgurða, og hendan høvdu tey fingið frá útróðrarmanni í Lorvík. So – eins og tey føldu seg væl at búgva í Gøtu – føla seg eisini væl í Lorvík.

### Frá skurðlækna til Gøtu læknadømi

Gunnar er annars skurðlækni, og hansara sergrein er krabbamein hjá konufólki.

Men tá hann hevði virkað sum yvirlækni í 15 ár, og børnini vóru undankomin, vildu hann og konan, sum er sjúkrasystir, uppliva eitt sindur av verðini.

Hetta hevur so ført tey kring stóran part av heiminum, har Gunnar hevur virkað sum lækni. Hann hevur verið í Indien og í fleiri londum í Afrika. Hann hevur virkað sum skipslækni á einum stuttleikaferðamannaskipi, og so hevur hann eisini verið í Grønlandi, har hann arbeiddi á sjúkrahúsinum í Godhavn í Diskovíkini.

### Úr Afrika til Gøtu

Gunnar hevur altíð havt áhuga fyri Føroyum, og tá hann sá eina lýsing um vikarstarvið hjá Andreasi, tóku hann og konan avgerð um, at hetta skuldi roynast. Teimum dámar sera væl í Føroyum, har Gunnar heldur, at náttúran er "underbar", hóast hann enn bert hevur sæð hana á vetri.

Um heilsustøðuna í Føroyum heldur Gunnar, at sammett við onnur samanberilig støð, er hon nakað tann sama og á góðari leið. Í Føroyum verður, eins og nógva aðrastaðni, klagað um heilsuverkið. Men Gunnar heldur, at enntá sammett við eitt so framkomið land sum Svøríki, so eru vit heilt væl fyri.

Í Føroyum kunnu fólk altíð koma í samband við lækna. Sleppa tey ikki sama dag, so sleppa tey í hvussu er dagin eftir, um tað eru vanlig læknaørindi. Er talan um serlig ørindi, sum t.d. barnakanning, gongur ikki longri enn vika at sleppa framat. Og er tørvur á tí, tekur tað ikki so langa tíð at fáa aðra viðgerð, sum t.d. við innlegging á sjúkrahús.

Hetta ger, at vit hava eina skipan, har tað er stutt millum borgaran og heilsuverkið, og er hetta sjálvsagt ein fyrimunur.

### Mugu ikki gera sum í Svøríki

Men hetta er als ikki nøkur sjálvfylgja. Í Svøríki kann tað vera næstan ógjørligt at koma í samband við kommunulækna yvirhøvur, tí telefonirnar nærum altíð eru upptiknar. Og eydnast so at koma ígjøgnum, kann tað taka mánaðir yvirhøvur at fáa eina tíð til eina viðtalu.

Eitt annað, sum er við at gera heilsuverkið í Svøríki so dýrt, er, at tað er "demokratiserað" so nógv. Í Føroyum verður vanliga eingin innlagdur uttan so, at hetta er ávíst av kommunulækna. Undantikið er sjálvsagt vanlukkur o.l. Í Svøríki er tað valfrítt, um farið verður til kommunulækna ella beinleiðis á sjúkrahús. Hetta er eisini við til at dýrka heilsuverkið munandi meira enn neyðugt. Tí sjúkrahúsini verða yvirrend av fólki, sum eins væl kundu farið til ein kommunulækna, og viðgerðin á einum sjúkrahúsi er nú einaferð nógv dýrari enn hjá kommunulæknanum. Hendan skipan er eisini spill av orku. Ein kommunulækni hevur altíð førleika at meta um, hvør víðari viðgerð, um hon er neyðug, er tann rætta. Men á einum sjúkrahúsi eru læknarnir serfrøðingar á hvør sínum øki. Tí kunnu sjúklingarnir koma at renna "frá Peri til Pól", inntil teir koma til tann rætta.

### Eiga at vera nøgd við okkara skipan

So niðurstøðan er greitt tann, at hóast tað altíð eru viðurskifti, sum tað kann bøtast um, so eiga vit grundleggjandi at vera nøgd við okkara skipan. Og vit hava so einki at læra av t.d. Svøríki. Tað kann vera gott at hava fólk, sum vita, hvussu vit skulu gera, men tað er eins umráðandi at hava fólk, sum vita, hvussu vit ikki skulu gera!

### Royking er av tí illa

Gunnar leggur dent á, at tað, sum hann metir at vera ein tann stórsta hóttanin móti heilsuni hjá fólki – eisini fiskimonnum – er royking. Tí hevur hann eisini ásett ein roykipolitikk á hansara arbeiðsplássi. Her er nevniliga bannað at roykja. Hann heldur nevniliga, at tey, sum arbeiða í heilsuverkinum, eiga at vera góð fyridømi fyri onnur. Og hetta er so satt, sum tað er sagt!

Tað verður so nógv tosað um trot á kommunulæknum í Føroyum. Men so leingi vit hava fólk sum Gunnar, man tað hóast alt fara at ganga.

Og so kunnu vit onnur fegnast um, at tað finnast útlendingar, sum eru so "merkiligir", at teir vilja koma aftur higar. Lukkutíð!



*Í summar vóru Gunnar og Ditte á Sandoynni. Her sæst Ditte saman við "okkara manni" í Skúvoy, Tummas Frank Joensen.*


## Blákrossheimið

Blákrossheimið er ein viðgerðarstovnur fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar og avvarandi teirra.

Hevur tú ella onkur tú kennir trupulleikar við rúsdrekka ella rúsevnum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Blákrossheimið á tlf. 315575, sum svarar alt samdøgrið.

***Vit kunnu m.a. bjóða...***

- ***avrúsan og viðgerð***
- ***einstaklinga samrøður (ambulant viðgerð)***
- ***samrøður saman við familjuni (familjuviðgerð)***
- ***eftirviðgerð - búpláss í búfelagsskapi***

Øll starvsfólkini á Blákrossheiminum eru yrkisfólk og alt fer sjálvandi fram í trúnaði.

***Vit vilja fegin hjálpa tær***

**Blákrossheimið** FO-100 Tórshavn
Lynggøta 12 Tlf. 31 55 75

Bjargingarútgerð

á sjógvi og landi

Vit bjóða tað besta innan bjargingarbátar, bjargingarvestar, eldsløkkiútgerð, bjarginar og trygdarútgerð.
Umboð fyri kenda danska merkið "Viking".

· Bjargingarbátar
· Bjargingarnet
· Yvirlívilsisdraktir
· Flótidraktir
· Bjargingarvestar
· Bjargingarkransar
· Epirbar/neyðsendarar
· Radartranspondarar
· Eldsløkkjarar
· Eldávaringar
· Branddraktir
· Umvælingar
· Eftirlit




P/F Gummibátatænastan
Mannaskarð 4, Postboks 3223, 110 Tórshavn
Tel. 31 49 13, Fax 31 06 56, E-mail: gummibad@post.olivant.fo

Skal skipið vaskast?

Tosið fyrst við EYSTUROYAR REINGERÐ

• Serkunnleiki innan vasking av aptering
• Vasking av maskinrúmi
• Reinsa teppi
• Bona gólv
• Reinsa koyggju og forheng
• Reinsa gamalt bonivoks
• Seyma nýggj forheng
• Útvega máttur, brúsuforheng, voksdúkar v.m.
• Brúsubakkar "Homequeen vinyl"
• Eisini leggja vit nýtt linoleum ella teppi á dúrkið

Eysturoyar Reingerð
Postboks 41 · FO-650 Toftir · tlf./fax: 44 89 88
fartlf: 22 53 50 · teldupostur: nch@post.olivant.fo

MAN B&W Diesel A/S

Umboðið · Ernst Reinert

Alpaha Diesel motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64

we make fishing more profitable



Vit framleiða og umvæla øll sløg av trolum, so sum:
■ Rækjutrol ■ Botntrol ■ Flótitrol ■ Semipelagisk trol

Vit framleiða og umvæla snurpunótir til:
■ Loðnu ■ Makrel ■ Sild

Vit framleiða og umvæla nótir til alivinnuna umframt:
• Vaska og impregnera nótir
• Levera komplettar fortoyningar, akker, tog o.a.

Annars hava vit alla útgerð til trol, nótir og alivinnuna

VÓNIN LTD.

Høvuðsskrivstova:
Vónin P/F
Bakkavegur 22
530 Fuglafjørður
Telefon 444 246
Telefax 444 579
www.vonin.com

Tórshavn:
Áløker
Telefon 35 43 91
Telefax 31 33 19

Miðvágur:
Telefon 33 29 46



Vit hava stórt úrval av reiðskapi til línuveiðu

Vit framleiða:
Flótilínu ◆ Spunpolyesterlínu ◆ Reyða línu
Terylene/Danlinelínu ◆ Reina Terylenelínu
Hvítar, reyðar, bláar og svartar teymar nr. 4-20

Línurnar fáast úr 3,5 til 9 mm. Longd millum svøvlarnar eftir ynski.

Teymarnir fáast órippaðir ella rippaðir við húkum í ymiskum støddum.

Vit hava eisini klæðir til fiski- og arbeiðsfólk frá innast til uttast.

◆◆◆vælkomin inn á gólvið

SNØRISVIRKIÐ
í Klaksvík
Tel. 455254 - Fax 457254
www.snorisvirkid.fo

TEYMAVIRKIÐ
í Runavík
Tel. 473000 - Fax 473001
www.teymavirkid.fo

Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

Søla og service:
Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera

Sp/f Contrive Jsp Ltd.
FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945

# Reyði Krossur vitjan úr Filippinunum

Týskvøldið 28. oktober var fundur í Unga Reyða Krossi í hølunum hjá Reyða Krossi á Bryggjubakka.Tann føroyski Reyði Krossur hevði bjóða leiðaranum hjá Reyða Krossi á Filippinunum, Edgar Majia, til Føroya, og hann greiddi frá arbeiðinum hjá Reyða Krossi millum gøtubørn á Filippinunum.



Myndatekstur!!!!!!



Myndatekstur!!!!!!

### Filippinirnar

Filippinirnar liggja í landsynningspartinum av Asia millum Indonesia og Kina. Har búgva umleið 85 milliónir fólk. Landið liggur sera illa fyri, tá ið vit hugsa um illveður, teir grensa upp móti Stillahavinum, og tað ger, at ódnirnar, ið koma inn frá havinum, raka teir fyrst, og tað eru umleið 25 stórar ódnir hvørt ár, ið gera stóran skaða. Aftrat tí, eru eisini umleið 20 aktivar vulkanir í landinum, ið kunnu bresta út eftir stuttari tí, og gerða stóran skaða.

Landið hevur verið merkt av kríggi í langa tíð. Japanesarnir tóku oyggjarnar undir 2. Heimsbardaga, og amerikanararnir tóku tær aftur við stórum missi av mannalívið. Eftir Heimsbardagan fingu Filippinirnar sjálvstýri, men síðan tá hevur landið verið merkt av borgarakríggi.

### Børnini hava tað sera ringt

Tað eru umleið 1,5 milliónir gøtubørn í Filippinunum. Hetta eru børn í eingi foreldur eiga, ella børn, ið eru rýmd heimanífrá, og eru farin út á gøturnar at búgva. Børn, ið ríma frá foreldrunum, eru ofta misnýtt heima, har tey bæði verða sligin og kynsliga misnýtt. Hesi børn hava tí ongan annan møguleika, enn at rýma út á gøturnar.

Tað eru umleið helvt um helvt av dreingjum og gentum. Genturnar hava tað nógv verri, tí tær eru veikari, og vera millum annað útsettar fyri kynsligum álopum.

Børnini bæði búgva og arbeiða á lossiplássum, har tey samla og skilja rusk, ið tey so selja fyri smápengar.

### Hvat ger Reyði Krossur

Reyði Krossur á Filippinunum hevur arbeitt við tiltakinum fyri gøtubørnini í umleið 10 ár. Teir gera hetta arbeiði í samstarvi við millum annað tann danska Reyða Kross, har Føroyar eisini eru við. Høvuðsendamálið hjá teimum er at koma út til børnini, tað vil siga, at teir gera ikki so nógv við herberg og annað tílíkt, tí teir meta, at teir gera mesta munin úti á gøtunum.

Tiltakið, ið teir hava havt bestu eyðnu við, er at teir fáa børnini við inn í tiltakið, har teir gera børnini til Barna Reyðakrossarbeiðarar. Hesi børnini fara so út á gøturnar at hjálpa øðrum børnum. Børnini eru sera góð til hetta arbeiðið, tí tey eru upplærd á gøtunum, og tey kenna viðurskiftini á gøtunum, so tey vita hvat tey tosa um, tá ið tey tosa við onnur børn. Hini gøtubørnini reagera eisini positivt upp á Reyðakrossarbeiðarnar, tí tey hava lætt við at tosa við tey. Hetta er eisini eitt tiltak, ið aðrar deildir hjá Reyða Krossi hava tikið til sín.

Reyði Krossur hevur eisini undirvísing fyri børnunum, ið ofta eru givin í skúlanum. Undirvísingin er eisini eitt sindur øðrvísi frá aðrari undirvísing, tí tey nýta ikki bøkur, men tekniseriur. Tey royndu fyrst at geva børnunum bøkur, men børnini dámdu tað ikki serliga væl, tí fóru teir at royna við tekniserium, og tað hevur víst seg, at børnini eru sera glað fyri tekniseriurnar.

Tað er Reyði Krossur sjálvur, ið ger tekniseriurnar. Teir brúka persónar, ið teir koyra inn í søgurnar, til dømis so er "Kaptein Reyði Krossur" hetjan í søgunum. Søgurnar eru eisini tiknar úr veruleikanum, so fleiri gøtubørn kunnu kenna seg aftur í frásøgnunum.

Undirernering er ein stórur trupulleiki millum børnini, so Reyði Krossur hevur gjørt eitt program, har hesi børnini sleppa á eitt 6 mánaðar langt skeið, har tey fyrst verða kanna fyri parasittar í kroppinum, tí hesir parasittarnir kunnu gera, at børnini ikki fáa hildi føðini í sær. Eftir hetta fáa børnini ordiligt at eta og annað, ið skal hjálpa teimum, at gerðast betri fyri aftur.

Reyði Krossur skipar eisini fyri ítrótti, har teir hava lítlar olympiadir, har børnini kappast. Hetta eru sera væl umtøkt tiltøk.

### Reyði Krossur er har, onnur ikki eru

Reyði Krossur fer eisini til fleiri støð, ið onnur ikki fara til, at hjálpa børnunum. Eitt av hesum støðum eru fongslini, ið eru á tremur av børnum. Løgreglan hevur loyvi at handtaka børn, sum onki hava gjørt. Summi av børnunum kunnu eisini sita inni í fongslunum upp í 5 ár, uttan at síggja ein dómara. Verða tey so funnin ósek, tá ið tey koma fyri ein dómara, so er tað bara synd, at tey hava sitið í fongsul í 5 ár – ósek.

Eitt annað stað, har Reyði Krossur ger eitt stórt arbeiði, er millum børn, ið búgva í kirkjugørðum. Hesi børnini búgva í grøvum, ið eru opnaðar, so vit kunnu nokk skjótt gerast samd um, at hetta er ikki eitt so stuttligt stað at búgva.

### Gera arbeiðspláss

Reyði Krossur luttekur eisini í nøkrum projektum, har teir hjálpa smáum fyritøkum í gongd, og so stuðla teimum í 3 ár. Fyrrverandi gøtubørn arbeiða á hesum virkjum, og yvirskotið fer alt til gøtubørnini, eisini eftir at Reyði Krossur hevur tikið seg út úr virkunum.

Sum dømi kunnu vit nevna, at Reyði Krossur rekur 2 vatnstøðir, har vatn verður reinsa og tappa á fløskur. Vatnið verður so selt, og yvirskotið fer til arbeiði við gøtubørnum.

### Hvat kunnu vit gera?

Føroyingar hava møguleika at fara til Filippinirnar, at arbeiða í eitt styttri tíðarskeið fyri Reyða Kross. Eitt nú kunnu skúlanæmingar fara í summarfrítíðini, at arbeiða millum børnini. Hetta er eitt tiltak, ið serliga svenskarar nýta nógv, har umleið 80 næmingar eru hvørt ár.

Ein konkret avtala er gjørd millum deildirnar hjá Reyða Krossi í Føroyum og Danmark, har føroyingar sleppa til Filippinirnar næsta ár. Hetta skal vera ein túrur, ið Reyði Krossur sjálvur skal rinda ein stóran part av útreiðslunum av.

Reyði Krossur Danmark stuðlar tiltakinum á Filippinunum við umleið 600.000 kr um árið, av hesum stuðlar Reyði Krossur Føroyar við 12%, tað vil siga umleið 75.000 kr um árið. Tey, ið eru áhugaði at stuðla arbeiðinum í Filippinunum, kunnu gera tað, við at stuðla Reyða Krossi. Tit kunnu finna fleiri upplýsingar inni á heimasíðuni: www.redcross.fo.

Um tit vilja hava fleiri upplýsingar um arbeiði á Filippinunum, so kunnu tit finna meir um arbeiðið á tí Internationalu síðuni hjá Reyða Krossi: www.ifrc.org. Til dømis er ein tíðindagrein frá 24. oktober inni á tí síðuni.



Myndatekstur!!!

# Stutt lýsing av støðuni viðvíkjandi vaktarskipunum í frálandavinnuni

Viðvíkjandi sáttmálaviðurskiftunum á vaktarskipunum í frálandavinnuni, bæði teimum, ið eru útgjørd til at halda vakt yvir einumhvørjum, sum hevur við fólk at gera og einum hvørjum, sum ikki hevur við fólk at gera, varð trupult at fáa ein sáttmála. Fyrsti sáttmálin varð undirskrivaður í oktober 2001. Áðrenn tað vóru skipari og stýrimenn starvsettir upp á ymiskar treytir, sum oftast var, at ein fekk eina ávísa krónuupphædd fyri hvønn dag í vinnu og so einki meir út yvir tey rættindir, sum viðkomandi hevði eftir løgtingslógini um sjómenn. Men sjómanslógin er bert galdandi fyri skip undir føroyskum flaggi, og tað vóru tá fleiri skip, har reiðarin var føroyingur búsitandi í Føroyum, sum ikki vóru undir føroyskum flaggi. Síðani tá eru fleiri skip afturat farin undir fremmant flagg, hóast reiðarin er føroyingur búsitandi í Føroyum.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur saman við hinum manningarfeløgunum eina samlagstrygging, ið er ein frítíðar vanlukkutrygging og ein felags lívstrygging. Harafturat hava Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Fiskimannafelag eina trygging móti hættisligum sjúkum. Ein treyt fyri at vera fevndur av teimum tryggingunum er, at ein er starvsettur eftir sáttmála, annaðhvørt millum eitt av feløgunum og eitt av reiðarafeløgunum, ella eftir sáttmála millum reiðaríið og eitt av feløgunum, ella eftir einum sáttmála, sum feløgini hava góðkent.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur mælt limum sínum til, ikki at mynstra til ein verri sáttmála enn tann, sum feløgini hava gjørt við Reiðarafelagið Fyri Farmaskip.

Aftan á at sáttmálin millum FSN og RFF varð broyttur við semju dagfest 25. apríl 2003, er tað FSN kunnugt, eitt felag við skipi undir fremmandum flaggi, ið ikki vil fylgja broytingunum, og at skipari og stýrimenn síðan tá hava verið starvsettir upp á ávísa krónu upphædd og einki annað. Tað er eisini hent, at sama reiðarí hevur sagt fólki upp, og hevur sagt, tá menn hava spurt um uppsagnarhýru, at viðkomandi, sum uppsagdur er, ikki hevur nøkur rættindir út yvir ta avtalaðu krónu upphæddina.

Um skipari og stýrimenn ikki eru mynstraðir eftir einum sáttmála, ella at skipið er undir føroyskum flaggi, so fær FSN onki gjørt við kravið um uppsagnarhýru ella onnur viðurskiftir. Tí hevur nevndin í FSN avgjørt at lýsa lýsingina høgrumegin:

## Frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag

Av tí at felagið er vitandi um, at reiðarí, á vaktarskipum í frálandavinnuni, bæði á skipum undir føroyskum flaggi, og skipum undir fremmandum flaggi, har reiðarin er føroyingur og búsitandi í Føroyum, ikki fylgja sáttmálanum millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Reiðarafelagið Fyri Farmaskip, fyri vaktarskip í frálandavinnuni, bæði á skipum, sum eru útgjørd og góðkend til at halda vakt yvir einumhvørjum, sum ikki hevur við fólk at gera, og skipum, sum eru útgjørd og góðkend til at halda vakt yvir einum hvørjum, sum hevur við fólk at gera, noktar Føroya Skipara- og Navigatørfelag limum sínum, bæði á skipum undir føroyskum flaggi, og á skipum undir fremmandum flaggi, at mynstra upp á verri sáttmála, enn tann sum er millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Reiðarafelagið fyri Farmaskip, síðst broyttur við semju dagfest 25. apríl 2003.

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

**Jólaboð:**

# Eitt áhugavert jólablað

Vit fáa um hesa tíðina ein hóp av bókum og útgávum til ummælis. Vit hava ikki pláss fyri at ummæla alt sum kemur.

Vit fara tó at taka Jólaboð fram. Hetta er jólabókin, sum verður givin út av KFUM, og er Jólaboð komið út í 63 ár. Seinastu 23 árini er tað Guttorm Zachariassen, sum hevur verið ritstjóri.

Tað er eingin ivi um, at tað er nógv siðsøgulgit tilfar, sum hevur staðið í teimum ymisku jólabókunum gjøgnum tíðirnar. Hetta er eisini galdandi fyri Jólaboð og ikki minst fyri útgávuna í ár.

Her er umframt vanligan jólalestur ein hópur av slíkum tilfari, og her eru eisini frásagnir frá sjólívi. Av siðsøguligum greinum eru "Minni frá gomlum døgum" við Gjógv, "Jól á Dronning Alexandrines Hospitali", "Stórt bragd og ein faðir", "Fyrsti túrur til skips", og "Skallagrímur – skálabáturin, ið hvarv".

Her kann verða nevnt, at Guttorm hevur eitt serligt samband við lagnuhendingar á sjónum. Hann misti nevniliga pápa sín við Stellu Argus, sum hvarv við meira enn 20 monnum á sildaveiðu í 1957.

Vit hava fingið loyvi til at endurprenta eina av frásagnunum, nevniliga um "Stórt bragd og ein faðir", sum er um eitt ótrúligt bjargingarbragd á sildaveiðu við Albert Victor í 1954. Hetta er eitt gott dømi um menn av stáli.

Jólaboð er eitt stak nosligt hefti. Tað er umbrotið av Ívar Guttesen og prentað av Einars Prent. Janus, beiggi Ívar hevur teknað. Kápumyndin er havnamynd teknað av Høga Wurdig Larsen.





# Trúgvur í 76 ár



**H.N. Jacobsens Bókahandil**




**130 kr** – heftur

**180 kr** – innbundin

# Sildarok á Skálafjørðinum

**Orð & myndir:**
**Torleif Johannesen**

Her kemur Bakkafossur hjá Rólant Jacobsen á Glyvrum fullfermdur inn á Bakka at avreiða.

Hetta var leygardagin 22. november, sum var ein góður dagur bæði til veður og til fiskiskap. Teir kastaðu tvær ferðir.

Fyrra kastið gav umleið 10 tons, og úr tí seinna tóku teir 7 tons, tá var báturin fullfermdur. Teir kastaðu út fyri sunnastu húsunum á Nesi.

Rólant sigur, at sildin er óvanliga stór og feit, tá hugsað verður um árstíðina. Tað fóru bara 4-5 til kilo.

Hann sigur eisini, at sildin er fyrr á veg í ár í mun til síðsta ár.

Rólant hevur fryst nøkur tons til agn, meðan meginparturin fer til ídna.

Sildin, sum teir frysta, verður brúkt bæði sum gogguagn og sum vanligt agn.

Síðstu vikurnar hevur nógv verið at hoyrt um rokfiskiskapin av toski á Føroya Banka. Skipini, sum hava egnt við sild, hava fingið væl meiri enn hini.

Sum eitt dømi, nevndi Rólant, at í august mánaða keypti ein bátur sild til agn, tí teir ætlaðu sær út á bankan. Teir settu 70 stampar, har meginparturin av agninum var sild, restin var høggislokkur. Teir fingu 25.000 pund, og største parturin var stórur toskur.



*Her kemur Bakkafossur fullfermdur inn á Bakka at avreiða.*



*Teir settu 70 stampar, har meginparturin av agninum var sild, restin var høggislokkur.Veiðan var ikki minni enn 25.000 pund,*

# Fiskifrøðingar gloyma sildafiskin

**Jón Kristiansson, íslendskur fiskifrøðingur, sigur, at grundin til, at vísindaliga kanningar vísa, at bara ungfiskur er, er tann, at eldri fiskurin er uppi í sjónum og etur sild**



Fiskifrøðinganir hjá ICES brúka skeiva útgerð til at kanna fiskastovnarnar við, sigur íslendski fiskifrøðingurin Jón Kristiansson.

Hetta grundar hann á, at hann hevur verið ein fýra daga langan túr við einum norðurírskum trolara, sum roynir við flótitroli í Írskahavinum.

Hesin trolarin fekk væl av stórum toski, sum fiskifrøðingarnir annars siga ikki at vera til.

Men tað er tí, sigur Jón Kristiansson, at teir, sum gera kanningar av fiskastovninum, brúka botntrol, har teir bara fáa ungfisk í.

Tað sigur seg sjálvt, sigur hann, tí tann eldri fiskurin er uppi í sjónum og etur sild. Tí fáa teir hann ikki og koma so til ta niðurstøðu, at hann er ikki til.

Hetta førdi hann fram í fyrilestri, hann helt á landsfundi Fólkafloksins í Sandavági leygardagin. Síðan førdi hann fram kendu niðurstøðu sína um, at verri standi fiskurin er í, meira eigur at verða fiskað, soleiðis at tað, sum eftir verður, kann fáa betri vakstrarlíkindi, tí partur hansara av ætinum verður størri.

Hyggjuráðini eru at taka tann stóra fiskin, so tann lítli kann vaksa.

– Tað er kent frá búskapinum, segði hann. Tekur tú teir stóru, blóma teir smáu.

Jørgen Niclasen, løgtingsmaður, viðmerkti, at føroyska fiskidagaskipanin byggir á teoriirnar hjá Jóni Kristianssyni.




## Sá, tá ið hann gjørdist blindur

Samson visti ikki, at Harrin var vikin frá honum. *Dóm. 16,20*

Yvirskriftin er ein setningur frá einum bíbliuskúlanæmingi, eftir at tey í tímanum høvdu lisið og tosað saman um Samson, dómaran í gamla Testamenti: Dóm.13,16.

Mamma Samson fekk eingi børn. So gjørdi Guð eitt undur. Hon fekk ein son, og kallaði hann Samson. Guð hevði eina heilaga ætlan við honum.

Hann var "Nasareari" og skuldi millum annað ikki klippa hárið, og var halgaður Harranum. Lív hansara byrjaði so væl. Andi Harrans var yvir honum frá føðingini av. Hann gekk Harrans vegir.

Við tíðini byrjaði hann tó at ganga egnar vegir, og endaði við at búgva saman við Dalilu, eini skøkju. Hann lítisvirdi Harrans kall og uppgávu, og valdi kvinnuna og girndina fram um lívið saman við Harranum.

Hann opnaði hjarta fyri henni, og segði loyndardómar sínar. Stóra hárið varð rakað av honum, og hann misti ovurhonds stóru megi sína.

Úrslitið av hesum sorgarleiki varð, at andi Harrans veik frá honum, uttan at hann visti av tí. Hann fall frá Guði – misti sambandið við Harran.

Skelkandi sigur Skriftin:

"Men hann visti ikki, at andi Harrans var vikin frá honum". *Dóm.16,20*

Omaná tað, so fangaðu Filistarnir hann, stungu eyguni út á honum og settu hann at mala kvørn í myrkustovu.

Søgan endar tíbetur ikki her. Bíblian sigur, at við kvørnina í myrkustovu hendir hetta:

"Men hárið á høvdi hansara tók aftur at vaksa, eftir at tað varð avrakað"

Í myrkustovu kom Samson av nýggjum at hugsa um lívið og um Harran.

Lívið kundi ikki livast umaftur, men syndin varð fyrigivin, og sambandið við Harran var knýtt av nýggjum.

Hvat mundi hann hugsað, tá hann hugdi aftur á lívið?

Søgan um Samson lýsir ein mann, sum gekk vandaleið.

Lívsins sanna stórleika og álvarsemi sá hann ikki "mitt í lívinum."

Tá lívið var um at vera liðugt, og eyguni vóru stungin út, sá hann tað.

Tá rópti Samson aftur á Guð:

"Harrin, drottin, minst til mín...!" Harrin hoyrdi bøn hansara.

Ikki øll fáa henda møguleika, tí deyðin fær klørnar í tey í syndalívinum.

Guð gevið tær og mær náði og vísdóm til at síggja lívsins stórleika og álvarsemi og liva rætt, meðan vit hava lívið.

*Vandi á vegnum,*
*varlig má vera mín ferð,*
*til hon í himli*
*endað í sæluni er*

*Ms.509*

**Føroya størsta úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

**Vit útvega eisini:**
Plastbakkar • Pakkibond • Tape • Merkir • Etikettir
Knívar • Kitlar • Húgvur • Handskar • Svintur
Ymisk tól til ídnaðin • Reingerðisevni • Íbindingarevni
Plattar • Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

... sjálvandi til besta prísin !!

**FARPACK**

Staravegur 5 • P.O. Box 3099 • 110 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon 35 30 00 • Fax 35 30 10 • e-mail: farpack@farpack.com
www.farpack.com

**Línubustir og goggar**

Hondbundin føroysk línubust
og hondgjørdir goggarar



Verða sendar um alt landið

**Bílegging:**
tlf: 42 40 34 / 42 30 01
fartlf: 21 33 17
fax: 42 47 97

**Fløttislið** (limur í Føroya blindafelag)

MASKINMEISTARASKÚLIN
*tín møguleiki – títt val*

## Maskinmeistaraútbúgvingin byrjar 5. januar 2004

Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta, hægri yrkisútbúgving, sum kann fáast í Føroyum, og gevur sera stórar møguleikar bæði á sjógvi og landi, umframt innan oljuvinnuna, har maskinmeistarar t.d. er størsti yrkisbólkur.

Útbúgvingin verður nakað broytt frá 2004, soleiðis at tað nú verður neyðugt frammanundan at velja, um ein ynskir at verða maskinistur ella maskinmeistari.
Upptøkan til maskinmeistara verður í januar og til maskinist í august 2004.

Báðar útbúgvingarnar verða moduluppbygdar.
Tað tekur framvegis 1 ár at lesa til maskinist og 3 ár til maskinmeistara. Upptøkutreytirnar eru framhaldandi tær somu.

Hevur tú hug at gerast maskinistur ella maskinmeistari, so kanst tú seta teg í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesturin saman við umsóknarblaðnum.



MASKINMEISTARASKÚLIN
Undir krákugjógv 5 · FO-100 Tórshavn
tlf. 350250 · fax 350251
e-mail: mms@mec.fo
Heimasíða: www.mec.fo

# Júpiter í 1930

Hesa myndina hava vit lánt frá Ólafi Guðmundssyni, føroyskum íslendingi ella øvugt. Hetta er eitt fult trolaradekk, soleiðis sum nógvir føroyingar kenna tað. Trolarin kundi eins væl verið føroyskur, men hann er íslendskur. Hetta er Júpiter GK161 í 1930.



FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna • Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar
Tlf: 311569

## Puss fiskurin

Á veg heim til Føroyar:
Eg hevði illa nok sett meg niður á wc-kummuna á flogvøllinum, tá ið ein rødd ljóðar úr næsta wc-básinum:
– "Hej, hvussu hevur tú tað?"
Nú eri eg ikki akkurát tann, ið byrji eina samtalu við ókent fólk á einum almennum toiletti, men fyri ikki at vera ófólkaligur, so svaraði eg:
– "Jú takk, eg havi tað gott".
Hin harrin sigur síðani:
– "Hvat gert tú?"
"Hvat hundans spurningur er hetta, hugsaði eg, og helt at nú byrjaði tað at vera heldur nærgangandi", men svari tó kortini:
– "Jú tað sama sum tú – úti og ferðist".
Samtíðis sum eg royni at skunda mær, at gera ørindini á wc-inum liðug, kemur ein nýggjur spurningur:
– "Kann eg koma yvir til tín?"
Nú byrjaði tað at vera heldur ræðandi, men fyri framvegis at vera fólkaligur, svaraði eg:
– "NEI... Eg eri upptikin beint nú".
Tá hoyrdi eg hann hinumegin siga eitt sindur ótryggur:
– "Tú, eg ringi aftur til tín seinni. Her situr ein í básinum við síðuna av og svarar øllum mínum spurningum".

*****

Pápi mín visti akkurát nær, hann skuldi doyggja. Hann kundi siga í hvørjum mánaða, ja hvønn dag og klokkutíma.
– Tað var løgi. Hvussu kundi hann vita tað?
– Dómarin segði honum tað.




*Hendan plakatin varð gjørd fyri nøkrum árum síðan. Men hon er framvegis aktuel. Hangið hana upp umborð!*

## dagsins MYND

# Mót-søgn

Hetta tykist at vera eitt paradoks. Í **Friðar**tún verður ávarað um spreinging!
Nú er so byrjað at spreingja fyri útbyggingini av ellisheiminum í Runavík.

